# Almannamálaráðið

**Løgtingið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 3. november 2017 |
| Mál nr.: | 16/00052 |
| Málsviðgjørt: | PL/HP/MFH/MM |

**Løgtingsmál nr. xx/2017: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.**

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.

(Pensjónsnýskipan)

### § 1

Í løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 49 frá 6. mai 2016, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 2, stk. 1, verður aftan á nr. 1 sum nýtt nr. sett:
“2) framskundað pensjón,”
Nr. 2-6 verða eftir hetta nr. 3-7.

**2.** § 2, stk. 2 verður orðað soleiðis:
“Allar pensjónir sambært § 4 og §§ 5 a-8 eru settar saman av eini grundupphædd og eini viðbót.”

**3.** Í § 3, stk. 1, nr. 3 og stk. 3 verður “fylta 67. árið” broytt til: “pensjónsaldur.”

**4.** § 3, stk. 4, 1. pkt. verður orðað soleiðis:
“Persónur, ið búsetir seg í Danmark ella í Grønlandi eftir at hava fingið tillutað fyritíðarpensjón ella framskundaða pensjón, varðveitir rættin til veitingina, inntil endalig avgerð um fyritíðarpensjón ella annað varandi uppihaldsgrundarlag er tikin í Danmark ella í Grønlandi, tó í mesta lagi upp til 3 ár og treytað av, at viðkomandi ikki í Danmark ella í Grønlandi fær almannapensjón ella aðra almannaveiting til uppihalds.”

**5.** Í § 3, stk. 4, 2. og 3. pkt., verður aftan á “fyritíðarpensjón” sett: “ella framskundaða pensjón”.

**6.** § 4 verður orðað soleiðis:
“**§ 4**. Fólkapensjónsaldurin er:

1) 67 ár fyri persón, ið er føddur áðrenn 1. juli 1957
2) 67 ½ ár fyri persón, ið er føddur í tíðarskeiðinum 1. juli 1957 til 31. desember 1962
3) 68 ár fyri persón, ið er føddur eftir 31. desember 1962

*Stk. 2*. Í 2025 og 5. hvørt ár eftir hetta verður gjørd útrokning sambært stk. 3, um fólkapensjónsaldurin skal tillagast fyri persón, ið er føddur eftir 31. desember 1962.

*Stk. 3.* Fólkapensónsaldurin fyri persón, ið er føddur eftir 31. desember 1962 verður hækkaður, um so er, at miðallívstíðin sambært eini meting frá Hagstovuni fyri tey 65-ára gomlu seinastu 2 árini fer upp um lívstíðina í 2013-2014, ið var 85,5 ár. Lívstíðin verður gjørd upp sum eitt einfalt miðaltal fyri menn og kvinnur. Um lívstíðin er hægri enn 85,5 seinastu 2 árini, ásetur landsstýrismaðurin fólkapensjónsaldurin samsvarandi lívstíðini fyri tey 65-ára gomlu seinasta árið lagt afturat ein treytaður vøkstur í lívstíðini á 0,2 ár og frádrigið eitt fólkapensjónstíðarskeið á 18 ár. Avrundað verður niður til næsta hálva ár.

*Stk. 4*. Fólkapensjónsaldurin verður tillagaður við í mesta lagi ½ ári í senn. Fólkapensjónsaldurin verður ásettur við virknaði frá 1. januar í álmanakkaárinum 10 ár aftaná árið, tá fólkapensjónsaldurin varð tillagaður sambært stk. 2.”

**7.** Aftaná § 5 verður sum § 5 a sett: “Framskundað pensjón kann tillutast persóni, sum lýkur treytirnar fyri tillutan av fyritíðarpensjón sbrt. § 8.
*Stk. 2*. Søkjast kann Almannaverkið um framskundaða pensjón frá 3 árum áðrenn galdandi pensjónsaldur sbrt. § 4.
*Stk. 3*. Framskundað pensjón sbrt. stk. 1 svarar til í minsta lagi miðal fyritíðarpensjón og fylgir annars teimum ásetingum, ið eru galdandi fyri útrokning av fyritíðarpensjón sambært kapittul 5 í hesi lóg.”

**8.** Í § 6 og § 7, stk. 1, nr. 1 verður “fylt 67 ár” broytt til: “rokkið pensjónsaldur”.

**9.** Í § 8, nr. 1, og § 8 a, stk. 1 verður “millum 18 og 67 ár” broytt til: “frá 18 ár upp til fólkapensjónsaldur”.

**10.** Í § 8, nr. 2 verður “millum 50 og 67 ár” broytt til: “frá 50 ár upp til fólkapensjónsaldur”.

**11.** Aftaná § 9 verður sum kapittul 3 a sett:

**“Kapittul 3 a**
**Útsett pensjón**

§ 9 a. Persónur, ið lýkur treytirnar í kapittul 3 um rætt til fólkapensjón, kann velja at útseta útgjaldið av fólkapensjón, smbr. tó stk. 2.
*Stk. 2.* Almannaverkið kann taka avgerð um at fólkapensjónin ikki kann útsetast, um tað verður mett sannlíkt, at treytirnar fyri upptjening av bíðiparti smbrt. stk. 3 ikki verða loknar, smbr. § 9 d, stk. 1 og 3.
*Stk. 3.* Í tíðarskeiðinum, tá fólkapensjónin verður útsett, verður samanspardur ein bíðipartur, ið verður nýttur til at rokna út eitt ískoyti, ið verður lagt afturat útsettu pensjónini, smbr. §§ 9 d-9 f.

§ 9 b. Umbøn um at fáa fólkapensjón útsetta verður latin Almannaverkinum samstundis sum ella aftaná, at søkt verður um fólkapensjón.
*Stk. 2.* Umbønin hevur virknað frá 1. í mánaðinum eftir, at umbønin er latin inn, tó í fyrsta lagi frá tí degi, tá fólkapensjónin kundi verið útgoldin, smbr. kap. 6.
*Stk. 3.* Pensjón kann í mesta lagi útsetast tvær ferðir við útgjaldið av fólkapensjón í tíðini ímillum.

§ 9 c. Fólkapensjónin kann útsetast í íalt 120 mánaðir.
*Stk. 2.* Umbøn um at steðga útsetanini av fólkapensjón verður latin Almannaverkinum við virknaði frá 1. í mánaðinum eftir, at umbønin um er latin inn.
*Stk. 3.* Útsetanin heldur uppat uttan áheitan, tá fólkapensjónin hevur verið útsett í 120 mánaðir.
*Stk. 4.* Doyr viðkomandi, meðan fólkapensjónin er útsett, heldur útsetanin uppat frá degnum eftir andláti.

§ 9 d. Rætturin til bíðipart er treytað av, at viðkomandi hevur havt inntøku av persónligum arbeiði í í minsta lagi 1000 tímar í einum álmanakkaári.
*Stk. 2.* Almannaverkið skal aftaná hvørt árið taka avgerð um, hvørt treytin um arbeiði smbrt. stk. 1 er lokin.
*Stk. 3.* Byrjar ella endar útsetanin av fólkapensjónini mitt í einum ári, verður kravið um arbeiði gjørt upp lutfalsliga sambært talinum á heilum mánaðum, ið fólkapensjónin er útsett í sama ári.
*Stk. 4.* Er kravið um arbeiði sambært stk. 1 og 3 ikki lokið í uppgerðartíðini, verður sæð burtur frá hesum tíðarskeiði, tá bíðiparturin verður gjørdur upp. Í staðin verður útgoldið ein einnýtisupphædd, ið svarar til fólkapensjónina, ið viðkomandi hevur rætt til í tíðarskeiðinum, smbr. tó § 9 e, stk. 3. Upphæddin verður roknað út við støði í inntøkuni hjá viðkomandi í tíðarskeiðinum, talan er um.
*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um uppgerð um vavið av arbeiðinum, herundir um persónligt arbeiði í sjálvstøðugari fyritøku og um eftirlit í hesum sambandi, eins og um útrokning av einnýtisupphæddum.

§ 9 e. Tá fólkapensjónin ikki skal útsetast longur ger Almannaverkið upp bíðipartin fyri tíðarskeiðið, tá fólkapensjónin hevur verið útsett, smbr. tó stk. 5.
*Stk. 2.* Bíðiparturin er 0,45 fyri hvønn mánað, fólkapensjónin hevur verið útsett. Fyri hvørjar samanhangandi 12 mánaðir, ið pensjónin verður útsett, verður bíðiparturin hækkaður við 10% av tí higartil samansparda bíðipartinum.
*Stk. 3.* Virðið á bíðipartinum verður avrundað til næsta heila tal.
Stk. 4. Hevur fólkapensjónin verið útsett í tvey tíðarskeið, smbr. § 9 b, stk. 3, verður bíðiparturin fyri útsettu fólkapensjónina gjørdur upp sum ein samanlegging av bíðipørtunum fyri hvørt tíðarskeið sær.
Stk. 5. Heldur útsetanin uppat við deyða, smbr. § 9 c, stk. 4, verður bíðipartur ikki útroknaður eins og at einnýtisupphædd samb. § 9 d, stk. 4, ikki verður útgoldin aftaná, at útsetanin er hildin uppat.

§ 9 f. Frá tí, at útsetanin heldur uppat, rindar Almannaverkið eitt mánaðarligt ískoyti afturat fólkapensjónini, smbr. stk. 2.
*Stk. 2.* Ískoytið verður roknað út sum bíðiparturin, smbr. § 9 e, býtt við 100 og faldað við ávikavist grundupphædd og viðbót til fólkapensjón sambært § 2, stk. 2.
Stk. 3. Útroknaða ískoytið verður avrundað til næsta heila krónutal.”

**12.** Í § 11, stk. 1 verður aftaná “fyritíðarpensjónisti” sett: “ella persóni, ið hevur fingið tillutaða framskundaða pensjón”.

**13.** Í § 12 a verður aftan á “fyritíðarpensjónistar” sett: “ella persónar, ið hava fingið tillutaða framskundaða pensjón”.

**14.** Í § 13, stk. 1 verður “yvir 67 ár” broytt til: “, ið hava rokkið pensjónsaldri,”

**15.** Í § 13, stk. 3 verður “við 67 ára aldur” broytt til: “, tá pensjónsaldur er rokkin”

og verður aftan á “fyritíðarpensjón” sett: “ella framskundaðari pensjón”.

**16.** Í § 14, stk. 1, verður “undir 67 ár” broytt til: “, ið hava rokkið pensjónsaldri,”.

**17.** Í § 17, stk. 1, 1. pkt. verður “fylta 67. árið” broytt til: “pensjónsaldur er rokkin”.

**18.** § 18, stk. 1 verður orðað soleiðis: “Grundupphæddin til fólkapensjón verður útgoldin uttan mun til fíggjarligu viðurskiftini hjá persóni, ið er føddur áðrenn 1. januar 1953.”

**19.** Í § 18 verður aftan á stk. 1 sum nýtt stk. sett:
*“Stk. 2.* Grundupphæddin til fólkapensjón verður lækkað við 25% av inntøkugrundarlagnum sambært § 20 fyri persón, ið er føddur aftaná 31. desember 1952.”
Stk. 2 og 3 verða eftir hetta stk. 3 og 4.

**20.** § 19, stk. 1 verður orðað soleiðis: “Viðbótin til fólkapensjón verður lækkað við 60% av inntøkugrundarlagnum sambært § 20 hjá persóni, ið er føddur áðrenn 1. januar 1953.”

**21.** Í § 19 verða aftan á stk. 1 sum nýggj stk. sett:
*“Stk. 2.* Viðbótin til fólkapensjón verður lækkað við 40% av inntøkugrundarlagnum sambært § 20 hjá persóni, ið er føddur aftaná 31. desember 1952. Lækking av viðbót verður gjørd í framhaldi av lækkingini av grundupphæddini.
*Stk. 3.* Fyri pensjónist, ið er føddur áðrenn 1. januar 1953, verður viðbótin til giftan fólkapensjónist, tá bæði fáa fólkapensjón, lækkað við grundarlagi í helvtini av samlaðu inntøkuni hjá báðum hjúnafeløgunum tilsamans. Er annar hjúnafelagin fevndur av § 19, stk. 2, verða inntøkurnar ikki lagdar saman, og lækkað verður bert í inntøkuni hjá tí hjúnafelaganum, ið er føddur áðrenn 1. januar 1953.”
Stk. 2-5 verða eftir hetta stk. 4-7.

**22.** Í § 20 verður aftaná stk. 2 sum nýggj stk. sett:
*“Stk. 3.* Afturat inntøkuni sambært stk. 1 skal leggjast útgjald av tvungnari uppsparing eftir reglunum í eftirlønarlógini.
*Stk. 4.* Ásetingin í stk. 3 er ikki galdandi fyri pensjónist, ið er føddur áðrenn 1. januar 1953.”
Stk. 2-6 verða eftir hetta stk. 5-9.

**23.** Í § 24, stk. 1 og § 26, stk. 2 verður aftaná “fyritíðarpensjón” sett: “, framskundaða pensjón”.

**24.** Í § 25, stk. 1, 2. pkt. verður aftan á “sambært” sett: “§ 5 a,”

**25.** Í § 25, stk. 1, nr. 1 verður aftaná “fyritíðarpensjónistur” sett: “ella persónur, sum hevur fingið tillutaða framskundaða pensjón”.

**26.** Í § 25, stk. 2 verður aftan á “fyritíðarpensjón” sett: “ella framskundaðari pensjón”.

**27.** Í § 26, stk. 1, verður aftan á “fyritíðarpensjón” sett: “, framskundaðari pensjón”.

**28.** Í § 26, stk. 2, verður “fylta 67. árið” broytt til: “, at pensjónsaldur er rokkin” og “alla” broytt til: “ella”.

**29.** Í § 30, stk. 3 verður “gerst 67 ár” broytt til: “røkkur pensjónsaldri”.

**30.** Í § 32 verður aftaná stk. 2 sum nýtt stk. sett:
“*Stk. 3.* Framskundað pensjón sbrt. § 5 a verður veitt frá 1. í mánaðinum aftaná dagfestingina fyri móttøku av umsóknini, tó í fyrsta lagi frá 1. í

mánaðinum eftir, at treytirnar eru loknar.”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. desember 2019 og er galdandi fyri útgjald av veitingum frá og við januar 2020.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið

**Um pensjónsnýskipanina**
Høvuðsendamálini við pensjónsnýskipanini eru:

*1. At tryggja øllum eina góða pensjón*
Øll tey, ið hava lítla ella onga inntøku framíhjá, fara at fáa meira at liva av. Eisini verður møguleiki fyri at fáa framskundaða pensjón, soleiðis at tey, ið eru kropsliga ella sálarliga slitin av arbeiðsávum, kunnu fara frá, áðrenn tey náa fólkapensjónsaldur.

*2. At eggja fólki at arbeiða eftir pensjónsaldur*
Tey, ið ynskja at arbeiða eftir pensjónsaldur fara at kunna velja at útseta fólkapensjónina, og afturfyri fáa hægri pensjónsútgjald, tá farið verður á pensjón. Eisini lækkar mótrokningarprosentið í viðbótini úr 60% niður í 40%, samstundis sum mótrokning millum hjún verður strikað.

*3. At styrkja búskaparliga haldførið*
Pensjónsaldurin hækkar ½ ár í 2025 og síðan aftur ½ ár í 2030. Síðan verður sett í verk ein skipan, har pensjónsaldurin verður treytaður av gongdini í miðal lívsævi hjá fólki, ið hava nátt fólkapensjónsaldur. Almannapensjónin verður í størri mun lagað til aðra inntøku, og land og kommunur fáa fleiri skattainntøkur so hvørt talið av pensjónistum hækkar við tað at útgjaldið úr Samhaldsfasta hækkar og fleiri fara at fáa pensjónsviðbót, ið bæði verða skattað við útgjald.

Nærri kunning um samlaðu pensjónsnýskipanina er í hjálagda fylgiskrivi “Pensjónsnýskipan 2020”.

Tørvur er á at gera eina pensjónsnýskipan, ið leggur framtíðar pensjónir í fastar karmar, og sum tryggjar fólkapensjónistum eitt virðiligt fíggjarligt grundarlag, og tørvur er á at pensjónsskipanin tryggjar fólkapensjónistum eitt smidligari tilknýti til arbeiðsmarknaðin.

Verandi almannapensjónslóg varð sett í gildi í ár 2000, og hóast fleiri smærri broytingar í lógini er framdar síðani, eru fleiri tættir í lógini, ið ikki eru nøktandi í mun til dagsins samfelag.

Kjakið í almenninginum og politiska kjakið hevur partvíst snúð seg um demografisku avbjóðingina og partvíst um fíggjarligu korini hjá fólkapensjónistum.

*Mynd 1: Tal av persónum 67 ár og eldri*




Fólkapensjónsaldurin hevur í Føroyum altíð verið 67 ár. Hinvegin er væntað miðal lívsævið hjá 67 ára gomlum økt munandi seinnu árini, og roknað verður við, at hesin vøksturin fer at halda fram. T.v.s., at árini sum fólkapensjónistur gerast fleiri og fleiri. Í 1985 kundu 67 ára gomul rokna við, at liva í miðal 14 ár aftrat. Í dag kunnu tey rokna við at liva næstan 19 ár aftrat, og í 2060 verður roknað við, at tey liva í miðal 22,7 ár aftrat.

*Mynd 2: Broyting í miðal lívsævi og framrokning til 2040*




Fíggjarligu umstøðurnar hjá fólkapensjónistum og javningin av pensjónini, hava fingið drúgva almenna umrøðu, og ein høvuðsorsøk til tað er, at inntøkuhækkingarnar hjá fólkapensjónistum ikki hava ligið í einari fastari legu. Skiftandi løgting hava á ymiskan hátt syrgt fyri, at inntøkurnar hjá

fólkapensjónistum hava fylgt við vøkstrinum í samfelagnum annars, men hetta hevur partvíst borið brá av tilvildarligum hækkingum. Pensjónsupphæddirnar verða javnaðar sbrt. lógini um áseting og javning, og er javningarprosentið sostatt broytt við jøvnum millumbilum. Grundupphæddin verður ikki javnað, meðan viðbótin og viðbót til ávísar pensjónistar (eisini nevnt brennistuðul) hevur verið broytt við ymiskum prosentsatsum (viðbót til ávísar pensjónistar/brennistuðul verður hereftir brúkt heitið VÁP). Tey síðstu árini hevur javningin verið 0%. Løgtingið hevur í nøkrum førum samtykt broytingar í sjálvum satsunum, heldur enn í javningarprosentinum. Samstundis hevur Løgtingið í nøkrum umførum bøtt um fíggjarliga grundarlagi hjá Samhaldsfasta arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum (hereftir Samhaldsfasti) og harvið eisini økt um útgjøldini úr Samhaldsfasta.

Tørvur er á einum smidligari sambandi millum pensjónsskipan og arbeiðsmarknað, sum í størri mun tekur hædd fyri, at føroyingar spara upp til egna pensjón, og sum í størri mun tryggjar fólkapensjónistunum, ið bert hava smávegis av inntøku aftrat pensjónini, betri fíggjarlig kor.
Hetta lógaruppskotið er partur av nýskipanini, ið er sett saman av broytingum í fleiri øðrum lógum. T.v.s., at eisini broytingar í øðrum lógum ávirka rættindi og inntøkur hjá komandi fólkapensjónistum.

Hetta uppskotið fevnir um broytingar í hesum tættum:

- Broytt samanseting av fólkapensjón
- Mótrokning millum hjún
- Útsett pensjón
- Framskundað pensjón
- Hækkaðum pensjónsaldri

Tó at broytingarnar skulu síggjast í eini heild, so verða tær niðanfyri viðgjørdar hvør sær. Broytingarnar gera pensjónsskipanina meira smidliga, men samstundis eisini í ein ávísan mun meira skynsama. T.v.s., at talan í nøkrum førum verður um økt krøv til pensjónistar og í øðrum førum er talan um at geva betri rættindi.

Pensjónsnýskipanin og hetta lógaruppskotið fevnir bert um persónar føddir eftir 31. des. 1952, og t.v.s. at uppskotið broytir ikki viðurskiftini hjá verandi pensjónistum, tó at aðrir partar av nýskipanini, sum ikki eru í hesum lógaruppskotinum, hava við sær, at inntøkan hjá verandi pensjónistum hækkar. Talan er um, at útgjald úr Samhaldsfasta hækkar og harvið hækkar inntøkuna hjá øllum fólkapensjónistum. Gildiskoman á broytingini í hesum lógaruppskotinum verður 1. januar 2020, og øll tey, sum tá eru fólkapensjónistar varðveita higartil galdandi rættindi.

*1.1.1. Broytt samanseting av pensjón*
Við kravinum um at rinda til eftirløn fara komandi pensjónistar í framtíðini at spara meira upp til egna pensjón, umframt at útgjaldið úr Samhaldsfasta við hesari nýskipan verður hækkað. Fyri at tryggja nøktandi støðið á vælferðarsamfelagnum verður neyðugt í størri mun at mótrokna í pensjónsveitingunum, soleiðis at tey, sum framhaldandi hava inntøku og tey, sum gjøgnum arbeiðslívið hava megna at spart upp til góðar eftirlønir, fáa minni í almannapensjón.

Verandi pensjónsskipan hevur nøkur lýti í mun, hvussu hon er sett saman av ymiskum veitingum og í mun til mótrokning av aðrari inntøku. Hjá nógvum pensjónistum loysir seg illa at hava arbeiðsinntøkur aftrat pensjónini, tí umframt at gjalda skatt av meirinntøku, verður onnur inntøka eisini mótroknað í pensjónini. Trupulleikin ger seg tó ikki galdandi hjá teimum pensjónistum, sum bert hava smávegis av inntøku og hjá teimum pensjónistum, sum hava fulltíðarstørv. Men at minka

arbeiðsvirkni líðandi ella at fara niður í hálva tíð loysir seg ikki fíggjarliga fyri tann einstaka pensjónistin.

T.v.s., at verandi pensjónsskipan forðar nógvum pensjónistum, at verða verandi á arbeiðsmarknaðinum og harvið fáa hægri inntøku, arbeiðsmarknaðurin missir arbeiðsmegi, og land og kommunur missa skattainntøkur. Nógvir pensjónistar ynskja sær helst eisini eina meira líðandi afturtøku av arbeiðsmarknaðinum.

*1.1.2. Mótrokning millum hjún*

Meginreglan í verandi pensjónslóg er, at fíggjarstøðan hjá einum hjúnum verður viðgjørd samlað, og at inntøka, sum ein giftur fólkapensjónistur hevur aftrat fólkapensjón og Samhaldsfasta, verður mótroknað í pensjónsviðbótini hjá hjúnafelaga. At inntøkan hjá einum persóni ávirkar rættin til fólkapensjón hjá einum hjúnafelaga verður mett ikki at vera tíðarhóskandi, og tí hava tað áður verið lagt uppskot fyri Løgtingið um at strika mótrokningina millum hjún. Tað hevur verið eitt rættiliga breitt ynski um at strika mótrokningina millum hjún. Ein av høvuðsorsøkunum til, at undirtøka higartil ikki hevur verið fyri uppskotunum er, at ein broyting hevði havt við sær, at nøkur hjún við broytingini høvdu fingið lægri inntøku, og politiskt hevur mann ikki ynskt at seta fólkapensjónistar í eina støðu, at fíggjarliga grundarlagið broytist munandi.

At strika mótrokningina millum hjúnafelagar er fyri flestu hjún ein fíggjarligur fyrimunur, men í nøkrum førum er hetta ein vansi. Hetta er treytað av, hvussu inntøkan er býtt millum hjúnafelagarnar. Hjá øllum teimum hjúnum, sum ikki hava inntøkur av týdningi hevur broytingin tó ongan týdning.

Fakfeløg og Landsfelag Pensjónista hava áður ført fram, at rættast er at strika mótrokningina millum hjún, og at rætturin til fólkapensjón ikki er treytaður av inntøkuni hjá einum møguligum hjúnafelaga.

Pensjónsnýskipanin verður bert galdandi fyri nýggjar pensjónistar, og t.v.s., at tað verður eitt høvi at gera broytingar av hesum slag, sum ikki raka pensjónistar, sum frammanundan hava tillagað seg eftir einum ávísum fíggjarligum grundarlagi. Verandi fólkapensjónistar verða sum nevnt ikki ávirkaðir av broytingini.

*1.1.3. Útsett pensjón*

Eitt av endamálunum við pensjónsnýskipanini er í størri mun at eggja fólki at arbeiða eftir pensjónsaldur, um tey hava hug og møguleika til tað, og ein partur av tí er, at møguleiki skal vera at útseta fólkapensjónina. Tørvur er á, at pensjónsskipanin er meira smidlig, og at pensjónistar í størri mun verða eggjaðir at útseta pensjónina soleiðis, at hetta verður ein vinningur fyri bæði fólkapensjónistin og fyri landið.

Í verandi skipan hava tey, ið fylla 67, ongar fíggjarligar grundgevingar at bíða við at søkja um fólkapensjón. Tað er ikki lógargrundarlag at útseta pensjónina við tí fyri eyga at fáa eina hægri pensjón seinni, og tað hevur við sær, at so at siga øll velja at søkja um pensjón – eisini tey, sum halda fram at arbeiða fulla tíð.

*1.1.4. Framskundað pensjón til niðurslitin*

Tað er eitt politiskt ynski, at persónar, sum eru kropsliga og sálarliga niðurslitnir, skulu hava møguleika at fara frá fyri pensjónsaldur við pensjón. Talan skal vera um aðra pensjón enn fyritíðarpensjón.

*1.1.5. Pensjónsaldur*

Støðuga menningin av samfelagnum hevur við sær, at livitíðin hækkar og talið av fólki í pensjónsaldri veksur. Henda jaliga gongd hevur við sær, at tað neyðugt at leggja upp fyri at vit gerast enn fleiri eldri í framtíðini. Harumframt hevur pensjónsnýskipanin øktar útreiðslur við sær, m.a til javning av almannaveitingum og eftirlønargjaldi omaná lønarlíknandi almannaveitingar. Hetta eru ábøtur, ið eru til gagns fyri borgaran. Tað er neyðugt at tryggja, at pensjónsnýskipanin hongur saman fíggjarliga.

At fremja pensjónsnýskipanina uttan hækkaðan pensjónsaldur, hevði sostatt havt við sær øktar útreiðslur til pensjónsendamál í mun til verandi skipan og hevði eisini minkað um haldførið í mun til verandi skipan.

*Mynd 3:: Tal av persónum 67 ár og eldri og talið av pensjónistum, um pensjónsaldur stigvíst hækkar til 70 ár*




At hækka pensjónsaldurin hevur fleiri endamál. Fyrst og fremst er tað fyri at fáa ein meira smidligan arbeiðsmarknað, ið er lagaður til hugin og orkuna at arbeiða hjá tí einstaka, og har tað ber til at fara líðandi av arbeiðsmarknaðinum. Tað er eisini neyðugt at økja um talið av fólki, ið framhaldandi eru á arbeiðsmarknaðinum fyri at leggja upp fyri at tað verða fleiri fólkapensjónistar. Hetta styrkir fíggjarliga grundarlagið undir bæði fólkapensjónini og útgjaldinum úr Samhaldsfasta.

*Mynd 4: Fólk í arbeiðsstyrkini fyri hvønn persón 67 ár og eldri*




Eisini fyri at varðveita haldførið í Samhaldsfasta er tørvur á, at aldurin á 67 ár fyri rætt til útgjald hækkar (sí uppskot um broyting í løgtingslóg um Samhaldsfasta).

Talið av fólkum 67 ár og eldri er økt øll árini síðani 1985, men lutfalsliga økingin tók ikki dik á seg fyrr enn í 2010.[1] Í 2009 vóru 12,2 prosent av íbúgvunum í Føroyum 67 ár ella eldri (sum er sama lutfall sum í 1996). Síðani 2009 er talið av fólkapensjónistum økt við 1554 og 1. januar 2017 eru 15 prosent av íbúgvunum í Føroyum 67 ár ella eldri. Árini frameftir fer talið av fólki 67 ár og eldri framhaldandi at økjast, samstundis sum talið av fólki í aldrinum 18-66 ár fer at lækka.

[1] Árini 1990 til 1995 var eisini ein ávísur lutfalsligur vøkstur, men tíðin tá var merkt av stórari fráflyting – serliga av yngri familjum og tað hevur ávirkað lutfalsliga talið av pensjónistum.

## 1.2. Galdandi lóggáva

### *1.2.1. Broytt samanseting av pensjón*

Verandi fólkapensjón er sett saman av eini grundupphædd og eini viðbót. Harumframt móttaka fólkapensjónistar eisini útgjald úr Samhaldsfasta og VÁP.

**Inntøka í 2017 hjá fólkapensjónistum, sum ikki hava inntøku aftrat pensjónini**

| | Um árið | | Um mánaðin | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | *Støk* | *Gift* | *Støk* | *Gift* | |
| Grundupphædd | 43.068 | 32.796 | 3.589 | 2.733 | Skattafrítt |
| Viðbót | 45.252 | 36.372 | 3.771 | 3.031 | Skattskyldugt |
| Viðbót til ávísar pensjónistar | 7.608 | 3.804 | 634 | 317 | Skattafrítt |
| Samhaldsfasti | 48.300 | 48.300 | 4.025 | 4.025 | Skattskyldugt |
| **Ársinntøka áðrenn skatt** | **144.228** | **121.272** | **12.019** | **10.106** | |
| Skattur og gjøld í alt | 20.852 | 17.597 | 1.738 | 1.466 | |
| **Inntøka eftir skatt og gjøld** | **123.376** | **103.675** | **10.281** | **8.640** | |

Viðm.: Roknað verður við miðal kommunu- og kirkjuskattaprosenti og eisini er gjald til Heilsutrygd og kringvarpið trekt frá

Grundupphæddin og útgjald úr samhaldsfasta verða veitt uttan mun til aðra inntøku, meðan viðbót og VÁP er tengt at aðrari inntøku. Umleið 2/3 av øllum fólkapensjónistum móttaka fullu upphæddina omanfyri.

*Mynd 5: Samanseting av pensjónsveitingum hjá støkum pensjónisti, áðrenn skatt*




Stakir fólkapensjónistar, sum hava inntøku hægri enn 60.000 kr. um árið missa rættin til VÁP – t.v.s., tá inntøkan fer upp um hesa upphædd, dettur øll upphæddin burtur í einum. Umframt at 7.608 kr. detta burtur í einum, so byrjar mótrokning á 60 %, tá inntøkan fer upp um 61.900 kr. Tað merkir, at

fyri hvørjar 100 kr. onnur inntøka fer upp um 61.900 kr., lækkar viðbótin við 60 kr. Havast skal í huga, at umframt lækkingina í viðbótini, verður skattur rindaður av meirinntøkuni, og tað merkir, at effektivi marginalskatturin hjá fólkapensjónistum, sum hava inntøku hægri enn uml. 60.000 kr. um árið, er ógvuliga høgur.

Ein stakur pensjónistur, ið hevur árliga inntøku á t.d. 65.000 kr. umframt fólkapensjón og Samhaldsfasta, hevur ein effektivan marginalskatt á uml. 75 %. T.v.s., at fyri hvørjar 100 kr. hann tjenar eyka, missir hann 60 kr. av viðbótini umframt at gjalda uml. 15. kr. í skatt. Av teimum 100 kr. hevur hann sostatt uml. 25 kr. eftir. Hetta er galdandi fyri fólkapensjónistar, sum hava inntøkur afturat fólkapensjón og Samhaldsfasta millum 61.900 kr. og uml. 140.000 kr. um árið.

Eini hjún kunnu tilsamans hava inntøku upp til 80.000 kr. áðrenn VÁP dettur dettur burtur.

Myndin niðanfyri vísir tøku inntøkuna hjá einum støkum fólkapensjónisti, sum hevur inntøku aftrat pensjónini. T.d. ein, sum hevur inntøku á 60.000 kr. um árið aftrat pensjónini hevur tøka inntøku á knappliga 13.500 kr. um mánaðin. Ein, sum hevur inntøku á 140.000 kr. um árið aftrat pensjónini hevur 1.200 kr. meira eftir um mánaðin. T.v.s., at út av hesum 80.000 kr., sum hann hevur í meirinntøku um árið, fær hann gott 14.000 kr. í sín part.

*Mynd 6: Tøk inntøka hjá støkum fólkapensjónistum, ið hava inntøku aftrat fólkapensjón og Samhaldsfasta*




Verandi skipan kann sostatt vera ein forðing hjá nøkrum av teimum, ið velja partvíst at verða á arbeiðsmarknaðinum, og hjá teimum, sum ynskja stigvísa afturtøku av arbeiðsmarknaðinum.

Hjá giftum pensjónistum er støðan ikki so einføld, at hon kann setast í eina mynd sum omanfyri. Hjá einum giftum pari verður upphæddin, sum tey kunnu forvinna, áðrenn mótrokning, løgd saman. Markið fyri mótrokning er sum nevnt 61.900 kr., áðrenn viðbótin byrjar at lækka, men hjún kunnu forvinna tað tvífalda – t.v.s. 123.800 kr. tilsamans um árið áðrenn mótrokning. Hvussu inntøkan er

býtt millum hjúnafelagarnar hevur sostatt ikki týdning. Hjún, ið tilsamans hava inntøku millum 123.800 kr. og uml. 200.00 kr. um árið hava ógvuliga høgan effektivan marginalskatt.

Føroyska pensjónsskipanin er – í mun til pensjónsskipanir í hinum norðurlondum – serlig á tann hátt, at pensjónistar, sum arbeiða fulla tíð, fáa ein lutfalsliga høga pensjónsupphædd útgoldna aftrat lønarinntøkuni. Tey, sum eru 67 ár og eldri, fáa altíð útgoldið grundupphæddina og gjald úr Samhaldsfasta, uttan mun til inntøku. Hjá støkum er hendan upphæddin tilsamans 7.608 kr. um mánaðin, harav 3.985 kr. eru skattafríar. Hjá teimum, ið eru gift, er upphæddin tilsamans 6.758 kr. um mánaðin, harav 2.733 kr. eru skattafríar. Meginreglan í øðrum londum er, at tey, ið hava vanligar arbeiðsinntøkur, ikki fáa stórvegis pensjón frá tí almenna.

*1.2.2. Mótrokning millum hjún*

Hjá teimum fólkapensjónistum, ið eru giftir við øðrum fólkapensjónisti, er rætturin til fólkapensjón treytaður av inntøkuni hjá hjúnafelaga. T.v.s., at ein pensjónistur, sum ikki hevur inntøku, kann missa rættin til viðbót, tí hjúnafelagin hevur inntøku.

Í § 19, stk. 1 í almannapensjónslógini er ásett at, *viðbótin til giftan fólkapensjónist verður, tá bæði fáa fólkapensjón, lækkað við grundarlagi í helvtini av samlaðu inntøkuni hjá báðum hjúnalfeløgunum tilsamans*.

Í praksis merkir hetta, at eini hjún kunnu hava inntøku á tilsamans 123.800 kr. um árið, áðrenn mótrokningin byrjar. Hvussu inntøkan er býtt millum hjúnafelagarnar hevur ikki týdning, og tað merkir t.d., at ein giftur fólkapensjónistur kann hava inntøku upp til 123.900 kr. uttan at blíva mótroknaður, um so er, at hjúnafelagin ikki hevur inntøku.

<u>Dømi</u>: Eini hjún, har annar hevur inntøku aftrat fólkapensjón og Samhaldsfasta á 100.000 kr. og hin á hevur inntøku á 50.000 kr., verða mótroknað soleiðis: Inntøkan verður løgd saman og síðani býtt í helvt. T.v.s., at tey bæði verða mótroknað sum um, at inntøkan er 75.000 kr. (150.000 býtt við 2). Mótroknað verður 60 % í inntøku, sum er hægri enn 61.900 kr., og tað merkir, at viðbótin lækkar við (75.000-61.900 kr.) x 0,6 = <u>7.860 kr. í part</u>.

Hjá einum fólkapensjónisti, ið er giftur við einum persóni, ið ikki er fólkapensjónistur, verður bert mótroknað í egnari inntøku. Hjá hesum er vanliga markið á 61.900 kr. galdandi.

Hjá fyritíðarpensjónistum verður ikki mótroknað millum hjún.

*1.2.3. Útsett pensjón*

Persónar, ið fylla 67 ár, kunnu við verandi skipan velja at bíða við at søkja fólkapensjón, men tað vil altíð vera ein fíggjarligur vinningur at søkja um fólkapensjón beinanvegin. Grundupphæddin og gjald úr Samhaldsfasta verða sum nevnt omanfyri útgoldin uttan mun til aðra inntøku, og t.v.s. at eisini tey, sum hava fulla arbeiðsinntøku og hava góðar inntøkur fáa fult útgjald.

At bíða við at søkja um pensjón ávirkar ikki pensjónsupphæddina seinni, og tað er ikki soleiðis, at hesi fáa hægri pensjón seinni. Tó er tað soleiðis, at persónar, sum eru 67 ár og eldri, og sum ikki fáa fólkapensjón, sbrt. ásetingarlógini hava rætt til ein frádrátt í skattinum, sum er 16.200 kr. um árið hjá støkum og 10.500 kr. hjá giftum. Men tað loysir seg betri fíggjarliga at søkja um pensjón, tí grundupphæddin til fólkapensjónistar er 43.068 kr. um árið til støk og 32.796 hjá giftum.

Útgjald úr Samhaldsfasta fer fram sjálvvirkandi, tá ein fyllir 67 ár, og ikki er neyðugt at søkja um veitingina.

### *1.2.4. Framskundað pensjón*

Fyritíðarpensjón kann sammetast við eina framskundaða pensjón. Fólkapensjón og fyritíðarpensjón hoyra undir somu lóggávu, men annars er ikki er nakað beinleiðis samband millum fyritíðarpensjón og fólkapensjón. Fyritíðarpensjón er m.a. ætlað teimum, sum eru niðurslitin áðrenn fólkapensjónsaldur, soleiðis at hesi antin kunnu fara heilt av arbeiðsmarknaðinum ella fara partvíst av arbeiðsmarknaðinum. Hægsta fyritíðarpensjón er til tey, sum ongan arbeiðsførleika hava, meðan miðal- og lægsta fyritíðarpensjón er til tey, sum í mesta lagi hava 50 % arbeiðsføri. Persónar, sum fáa miðal- og lægstu fyritíðarpensjón kunnu arbeiða niðursetta tíð og hava eina ávísa inntøku aftrat fyritíðarpensjónini. Fyritíðarpensjón er ein varandi veiting, sum ein persónur vanliga hevur rætt til, inn til viðkomandi fyllur 67 ár. Tá ein fyritíðarpensjónistur fyllir 67 ár, flytur hann av sær sjálvum til fólkapensjón.

Veitingarnar eru ymiskar í upphædd, og fyritíðarpensjónistar fáa alla sína inntøku úr landskassanum, meðan ein týðandi partur av inntøkuni hjá fólkapensjónistum stavar frá Samhaldsfasta. Fyritíðarpensjónin er hægri enn fólkapensjónin, og sostatt lækkar inntøkan hjá fyritíðarpensjónistum, sum fylla 67 ár.

***Fólka- og fyritíðarpensjón 2017 eftir skatt, arbeiðsmarknaðar-, heilsutrygdar- og kringvarpsgjald (upph. pr. mðr.)***

| | Støk | Gift |
|---|---|---|
| *Fólkapensjón* | 10.281 | 8.640 |
| *Hægsta fyritíðarpensjón* | 13.169 | 10.944 |
| *Miðal fyritíðarpensjón* | 10.689 | 8.668 |
| *Lægsta fyritíðarpensjón* | 10.651 | 8.562 |

Í flestu grannalondunum er fyritíðarpensjónin í høvuðsheitum til tey, sum ongan arbeiðsførleika hava. Hinvegin hava nøkur av londunum aðrar fyriskipanir til tey, sum hava partvísan arbeiðsførleika, men hetta er í høvuðsheitum fyribils veitingar.

Persónar, sum eru niðurslitin og hava varandi skerdan arbeiðsførleika, kunnu eisini fara í tillagað starv sbrt. lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk. Talan er um fyriskipan á vanliga arbeiðsmarknaðinum, har arbeiðsgevarin rindar fyri tað, sum viðkomandi leggur eftir seg á arbeiðplássinum, men harumframt verður veitt eitt lønarískoyti, soleiðis at inntøkan hjá borgaranum vanliga svarar til sáttmálaløn. Persónar í tillagaðum starvi eru tryggjaðir eina skattskylduga inntøku á uml. 19.500 kr. um mánaðin (undantikið tey, sum altíð hava arbeitt niðursetta tíð – t.v.s. eisini áðrenn tey hava fingið skert arbeiðsføri).

Umleið 30% av teimum 65 og 66 ára gomlu eru fyritíðarpensjónistar ella eru í tillagaðum- ella vardum starvi. Hetta eru fólk, sum m.a. eru niðurslitin av arbeiðsávum, fólk sum hava varandi sjúku ella brek o.a. Harumframt eru onnur í hesum aldursbólkinum, sum í eini fyribils støðu ikki eru á arbeiðsmarknaðinum, og sum móttaka sjúkradagpening, forsorg ella møguliga arbeiðsloysisstuðul.

*1.2.5. Fólkapensjónsaldurin*

Tá ein persónur fyllir 67 ár, fær viðkomandi rætt til fólkapensjón og rætt til veiting úr Samhaldsfasta. Tað skal søkjast um fólkapensjón, meðan útgjald úr Samhaldsfasta fer fram sjálvvirkandi. Talan er um ein lógartryggjaðan rætt, sum er treytaður av, at umsøkjari hevur:

- danskan heimarætt ella er giftur við ella seinast hevur verið giftur við einum persóni við donskum heimarætti,
- hevur fastan bústað í Føroyum ella hevur hýru við skipi skrásett í Føroyum ella
- hevur fastan bústað í danska ríkinum í minsta lagi 3 ár frá 15. árinum til fylta 67. árið.

So at siga øll, sum fylla 67 ár, søkja um fólkapensjón. Tey, sum ikki søkja um fólkapensjón, fáa í staðin rætt til ein frádrátt í skattinum, sum er 16.200 kr. um árið hjá støkum og 10.500 kr. hjá giftum. Men tað er altíð ein fíggjarligur fyrimunur at søkja um fólkapensjón, og tað er sostatt bert í undantaksførum, at møguleikin við frádrátti heldur enn fólkapensjón verður brúktur. Grundupphæddin í fólkapensjónini er 43.068 kr. um árið hjá støkum og 32.796 kr. hjá giftum, og t.v.s. ein munandi størri upphædd enn frádrátturin er í skattinum.

Ein partur av føroyingum eru farnir av arbeiðsmarknaðinum, áðrenn teir fylla 67 ár. Í flestu førum er talan um persónar, sum fáa fyritíðarpensjón, og tað merkir, at hækkaður pensjónsaldur í ein ávísan mun fer at hava við sær, at aðrar útreiðslur fara at hækka. T.d. útreiðslur til fyritíðarpensjón, men eisini kann væntast ein ávísur vøkstur í útreiðslum til forsorg, sjúkradagpening, tillaga størv, vard størv o.a.

## 1.3. Endamálið við uppskotinum

Yvirskipaða endamálið við pensjónsnýskipanini er at tryggja framtíðar fólkapensjónistum eitt virðiligt fíggjarligt grundarlag, sum tekur atlit at framtíðar demografisku broytingunum, og at fáa eina pensjónsskipan, sum kann tillagast umstøðunum hjá tí einstaka fólkapensjónstinum.

Hetta lógaruppskotið, ið er sett saman av ymiskum broytingum, ið ikki beinleiðis hanga saman, hevur til endamáls at røkka yvirskipaða málunum, ið eru nevnd omanfyri. Pensjónsnýskipanin verður bert galdandi fyri nýggjar pensjónistar – t.v.s. persónar, sum eru føddir eftir 31. des. 1952. Tey, sum eru blivin fólkapensjónstar áðrenn 1. januar 2020, halda fram sbrt. verandi pensjónsskipan.

*Mynd 7: Tal av fólkapensjónistum í verandi pensjónskipan og í nýskipan*




### *1.3.1. Broytt samanseting av pensjón og mótrokning*

Broytta samansetingin av pensjón hevur fleiri endamál. Høvuðsendamálið er, at tað betur skal loysa seg hjá fólkapensjónistum at arbeiða, og tað skal kunna loysa seg at taka seg stigvíst aftur av arbeiðsmarknaðinum. Eisini fer at vera mótroknað í grundupphæddini hjá teimum, ið hava lutfalsliga høgar inntøkur aftrat pensjónini. Samansetingin verður eisini eitt sindur einfaldari, tí VÁP dettur burtur.

VÁP hevur í dag sama endamál sum viðbótin í fólkapensjónini. Talan er um uppihaldsveiting, sum verður veitt pensjónistum við lágum inntøkum. VÁP er tó, sum nevnt omanfyri, skipað øðrvísi og hevur nakrar óhepnar eginleikar. Tí verður VÁP frameftir ikki partur av fólkapensjónini, og viðbótin í fólkapensjónini hækkar í staðin, soleiðis at tey, ið ikki hava, ella bert hava smávegis av inntøku aftrat pensjónini, varðveita eins høga tøka inntøku, sum tey hava í dag – hetta hóast tey missa rættin til VÁP.

**Inntøka hjá fólkapensjónistum uttan aðra inntøku enn fólkapensjón og Samhaldsfasta, áðrenn og eftir skatt**

| | **Støk** | | **Gift** | |
|---|---|---|---|---|
| | *Verandi (2017)* | *Nýskipan (2020)* | *Verandi (2017)* | *Nýskipan (2020)* |
| Grundupphædd | 43.068 | 43.068 | 32.796 | 32.796 |
| Viðbót | 45.252 | 57.348 | 36.372 | 42.444 |
| Viðbót til ávísar pensjónistar | 7.608 | - | 3.804 | - |
| Samhaldsfasti (írokn. mett framskriving) | 48.300 | 67.500 | 48.300 | 67.500 |
| **Ársinntøka áðrenn skatt** | **144.228** | **167.916** | **121.272** | **142,740** |
| Skattur og gjøld í alt | 20.852 | 31.699 | 17.597 | 26.250 |
| **Inntøka um árið eftir skatt og gjøld** | **123.376** | **136.217** | **103.675** | **116.490** |
| **Inntøka um mðr. eftir skatt og gjøld** | **10.281** | **11.351** | **8.640** | **9.708** |

Talvan omanfyri vísir, at fólkapensjónistar, ið ikki hava aðra inntøku enn fólkapensjón og Samhaldsfasta, hava somu inntøku áðrenn og aftaná skatt í báðum pensjónsskipanum. T.v.s. at persónurin, ið fyllur 67 ár 31. des. 2019 og tann, sum fyllur 1. januar 2020, koma at hava áleið somu inntøku eftir skatt (um so er, at teir ikki hava aðra inntøku aftrat pensjón og Samhaldsfasta).

Pensjónsnýskipanin hevur við sær grundleggjandi broytingar viðv. mótrokning, og tí verða fíggjarligu viðurskiftini øðrvísi hjá teimum, sum hava inntøku aftrat fólkapensjón og Samhaldsfasta. Markið fyri mótrokning lækkar úr 61.900 kr. niður í 30.000 kr., mótrokningin verður linari, og tað fer at verða mótroknað í grundupphæddini.

*Mynd 8: Samanseting av pensjónsveitingum hjá støkum pensjónisti, áðrenn skatt*




Myndin vísir, at fyrst verður mótroknað í grundupphæddini við 25 %. T.v.s., at fyri hvørjar 100 kr. í inntøku lækkar grundupphæddin við 25 kr. Tá ein stakur pensjónistur hevur inntøku aftrat fólkapensjón og Samhaldsfasta á uml. 202.000 kr., er grundupphæddin fult mótroknað. Tá heldur mótrokningin fram í viðbótini, men við 40 %. Tá inntøkan fer upp um uml. 346.000 kr. er øll fólkapensjónin mótroknað.

*Mynd 9: Tøk inntøka hjá støkum fólkapensjónistum, frá ár 2020*




Myndin vísir, at tøku inntøkuna eftir ávikavist verandi skipan og nýskipanini. Tey, sum hava inntøku millum 30.000 og 60.000 kr. um árið fara at fáa lægri tøka inntøku, tí mótroknað verður frá 30.000 kr. í staðin fyri 61.900 kr. sum í dag.

Tað er ymiskt, hvussu broytta samansetingin og broytta mótrokningin ávirkar ymsar inntøkubólkar. Talvan niðanfyri vísir, hvussu pensjónsnýskipanin ávirkar ymiskar inntøkubólkar.

| **kr./ mðn.** | **0 kr.** | **30 tkr.** | **55 tkr.** | **150 tkr.** | **200 tkr.** | **350 tkr.** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Verandi, 2017 | 10.331 | 11.917 | 13.239 | 15.233 | 17.820 | 24.839 |
| Nýskipan, 2020 | 11.351 | 12.937 | 13.738 | 16.614 | 18.007 | 22.105 |
| Munur | 1.020 | 1.020 | 499 | 1.382 | 187 | -2.734 |

Pensjónsnýskipanini hevur við sær, at útgjald úr Samhaldsfasta yvir 3 ár hækkar við uml. 1.600 kr., og hetta verður eisini galdandi fyri allar verandi pensjónistar. T.v.s., at allir verandi pensjónistar fara at fáa hægri inntøku. Fyri nýggjar pensjónistar fara tey við inntøkum frá 0 til 30.000 kr. at hava somu tøku inntøku, sum verandi pensjónistar. Fyri tey, sum hava hægri inntøkur fara nøkur at fáa meira og onnur minni. Tó fara tey, sum hava høgar inntøkur ikki at fáa grundupphædd, og tað merkir 2.734 kr. minni um mánaðin.

Ein vansi við nýggju samansetingini er, at mótrokningin verður minni gjøgnumskygd. Frameftir verður mótroknað við tveimum ymiskum satsum. Fyrst við 25% í grundupphæddini og síðani við 40 % í viðbótini. Fyri at mótrokningin skal vera so jøvn sum gørligt, er neyðugt at hava ymisk mótrokningarprosent, tí grundupphæddin er skattafrí, meðan viðbótin er skattskyldug. Hóast

mótrokningarprosentini eru ymisk, so er reelt talan um áleið somu mótrokning soleiðis at skilja, at tað sum fólkapensjónisturin hevur eftir aftaná skatt og mótrokning er áleið tað sama uttan mun til, um mórtoknað verður við 25% í grundupphæddini, ella um mótroknað verður við 40% í viðbótini.

*Mynd 10: Marginalskattur og mótrokning hjá støkum fólkapensjónisti sbrt. nýskipanin*




### *1.3.2. Mótrokning millum hjún*

Endamálið við broytingini er, at rætturin til pensjón einans er tengdur at egnum fíggjarviðurskiftum og egnari inntøku. Soleiðis er tað í verandi skipan hjá pensjónistum, sum ikki eru giftir - t.v.s. bæði hjá støkum og hjá teimum, sum liva í parlagi uttan at vera gift. Í verandi skipan er tað í flestu førum ein fíggjarligur vansi at vera giftur.

Tað eru fleiri hjún, sum fáa ein fíggjarligan fyrimun av at strika mótrokningina, enn tað er, sum fáa ein vansa. T.d. øll tey hjún, har annar parturin er á arbeiðsmarknaðinum, og hin er farin av arbeiðsmarknaðinum, verða í verandi skipan fult mótroknaði. T.v.s., at hvørgin parturin fær viðbót. Tá mótrokningin millum hjún verður strikað, fer tann, sum er farin av arbeiðsmarknaðinum, at fáa fulla viðbót, tí mótrokningin fer at hava støði í egnari inntøku (meðan tann, sum er á arbeiðsmarknaðinum verður fult mótroknaður).

Tað verður ein vansi hjá teimum, sum tilsamans hava lága inntøku aftrat fólkapensjón og Samhaldsfasta, og har inntøkan er ójavnt býtt millum hjúnafelagarnar. Við higartil galdandi meginreglu kunnu eini hjún brúka mótrokningarfríu upphæddina hjá hvørjum øðrum. T.v.s., við verandi skipan, har markið fyri mótroking er 61.900 kr., kunnu hjúnini tilsamans hava inntøku á 2 x 61.900 kr. áðrenn mótroknað verður. Hevur annar parturin inntøku á t.d. 120.000 kr. og hin parturin onga inntøku er ongin mótrokning. Frameftir verður markið fyri mótrokning sum nevnt 30.000 kr., og tað merkir, at tá inntøkan hjá øðrum partinum fer upp um hesa upphædd, verður mótroknað.

Fólkapensjónistar, ið eru giftir við einum, sum ikki er fólkapensjónistur, verða í verandi skipan ikki mótroknaðir í inntøku hjá hjúnafelaga. Ein vanlig støða er, at aldursmunur er á hjúnafeløgum, og tí

er tað annar parturin, sum fyrst blívur pensjónistur, meðan hin er eftir á arbeiðsmarknaðinum. Hetta hevur verið galdandi síðani 2011. Við hesum lógaruppskoti verður hetta galdandi fyri allar nýggjar pensjónistar.

*1.3.3. Útsett pensjón*

Endamálið við útsettari pensjón er at eggja fólki at arbeiða eftir vanligan pensjónsaldur og at gera eina meira fleksibla pensjónsskipan, sum kann tillagast ynskinum hjá tí einstaka – t.v.s. borgarin kann velja at hava eitt longri arbeiðslív og afturfyri fáa hægri pensjón. Við hesum verður pensjónsskipanin ein fíggjarligur fyrimunur fyri bæði tann einstaka og fyri samfelagið. Fyrimunurin fyri borgaran er, at pensjónsgjaldið verður hægri, tá farið verður á pensjón, og samfelagið hevur fyrimun av størri arbeiðsútboði og hægri skattainntøkum.

Upphæddin, ið verður løgd aftrat pensjónini verður nevnd bíðiviðbót. Tað er bara fólkapensjónin, ið kann útsetast. Útgjald frá Samhaldsfasta verður útgoldið, hóast pensjónin ikki verður útgoldin – t.v.s. Samhaldsfasti kann ikki útsetast. Pensjónin kann í mesta lagi útsetast í 120 mánaðir, svarandi til 10 ár. Fy
‘ri hvønn mánað pensjónin verður útsett, verður ein bíðiviðbót løgd aftrat pensjónini svarandi til 0,45 av pensjónsupphæddini. Harumframt verða 10 % av tí higartil uppspardu upphæddini løgd aftrat fyri hvørjar 12 samanhangandi mánaðir, pensjónin verður útsett.
Roknaða prosentstigið verður so rundað til næsta heila tal.

*Dømi*

Ein persónur, ið útsetir pensjónina í 12 mánaðir, fær eina bíðiviðbót svarandi til 6% av fólkapensjónini. Bíðiviðbótin í hesum døminum verður roknað soleiðis:

*(12 mánaðir x 0,45) + 10% = 5,94* (ið verður rundað til 6%)

Um persónurin útsetir pensjónina í 15 mánaðir verður bíðivíðbótin roknað soleiðis:

*(12 mánaðir x 0,45) + 10% + (3 mánaðir x 0,45) = 7,29* (ið verður rundað til 7%)

Pensjónin kann sum nevnt í mesta lagi útsetast í 120 mánaðir, og tá er bíðiviðbótin komin upp á 95% av fólkapensjónini.

*Mynd 11: Virðið av samlaðu uppspardu bíðiviðbótini*




Eins og tað skal søkjast um fólkapensjón, so skal tað eisini søkjast um útsetta pensjón, og tað skal søkjast áðrenn pensjónin ætlast útsett. Útsett pensjón verður ikki játtað afturvirkandi, og t.v.s., bíðiviðbót kann í fyrsta lagi vera galdandi frá umsóknardegnum.

Tá tíðarskeiðið, sum ein persónur hevur søkt um útseting til, er umliðin, verður bíðiviðbótin roknað út og útgoldin saman við fólkapensjónini og eftir somu treytum sum fólkapensjónin.

Hugsanin handan útsettari pensjón er, at tað skal stuðla undir haldføri, og tað gerst við, at tað verður ein fyrimunur fyri borgaran og fyri samfelagið. Fyrimunurin fyri samfelagið er serliga, at borgarin í staðin fyri at fáa pensjón, er virkin á arbeiðsmarknaðinum og harvið eisini rindar skatt til land og kommunur. Tí er tað ein treyt fyri at kunna útseta pensjónina, at viðkomandi hevur lønt arbeiði frá í minsta lagi 1000 tímum í einum ári (svarandi til uml. ½ tíð).

Hjá persónum, sum hava rætt til brøkpensjón, verður virðið av bíðipartinum roknað, sum um talan er um fulla pensjón, og síðani verður veitingin javnað sambært brøkinum, sum viðkomandi hevur rætt til.

### *1.3.4. Framskundað pensjón*

Framskundað pensjón hevur til endamáls at geva persónum, sum eru likamliga og sálarliga niðurslitnir, ein møguleika at fáa pensjón áðrenn fólkapensjónsaldur. Søkjast kann um framskundaða pensjón trý ár áðrenn fólkapensjónsaldur. Framskundað pensjón svarar til eina veiting á í minsta lagi miðal fyritíðarpensjón.

Treytin fyri at fáa framskundaða pensjón er, at arbeiðsføri skal vera skert við í minsta lagi eini helvt. Um umsøkjari onki arbeiðsføri hevur eftir, er veitingin svarandi til hægstu fyritíðarpensjón.

Í veruleikanum er ikki talan um týðandi broyting í mun til higartil galdandi lóg, har persónar við skerdum arbeiðsføri hava rætt til fyritíðarpensjón.

*1.3.5. Fólkapensjónsaldur*

Endamálið við hækkaðum pensjónsaldri er at gera pensjónsskipanina meira fíggjarliga haldføra. Fólkapensjónsaldurin fer at hækka stigvíst komandi árini – fyrstu ferð í 2025, tá hann hækkar upp í 67,5 ár, og aðru fer í 2030, tá fólkapensjónsaldurin verður 68 ár. Eftir hetta verður fólkapensjónsaldurin ásettur eftir einum livitíðarindeksi, soleiðis at pensjónsaldurin hækkar samsvarandi miðal livitíðini hjá føroyingum, tó ongantíð meira enn ½ ár í senn.

Hvørt 5. ár verður miðal livitíð føroyinga kannað, og um liviárini eru longd nóg nógv, hækkar fólkapensjónsaldurin. Pensjónsaldurin kann sum nevnt í mesta lagi hækka við hálvum ári hvørja ferð. T.v.s. at pensjónsaldurin kann í mesta lagi hækka við hálvum ári 5. hvørt ár. Hækkingin verður altíð framd við 10 ára varningi. Fyrstu ferð livitíðin verður kannað er í 2025, og t.v.s., at pensjónsaldurin kann hækka sambært livitíðarindeksinum í fyrsta lagi í 2035.

Bláa strikan í myndini niðanfyri vísir mettan pensjónsaldur sambært livitíðarindeksinum, men av tí at, pensjónaldurin í mesta lagi kann hækka við hálvum ári hvørja fer, hækkar pensjónsaldurin sbrt. svørtu strikuni.

*Mynd 12: Broyting í pensjónsaldri sambært livitíðarindeksi*




Gevið gætur, at myndin omanfyri vísir pensjónsaldurin, um so er, at lívsævi verður, sum framrokningin vísir.

Grundarlagið undir, um pensjónsaldurin kann hækka, er miðal lívsævið hjá 65 ára gomlum. T.v.s. hvussu nógv ár í miðal væntast tey, sum eru 65 ár at liva. Munur verður ikki gjørdur á kvinnum og monnum. Um miðal lívsævi tey síðstu 10 árini er hækkað, kann pensjónsaldurin hækka.

Fyrstu fer tað skal roknast út, um pensjónsaldurin kann hækka, er í 2025 (við virknaði frá 2035), og tá er tað sostatt hækkingin í lívsævinum tey 10 árini, sum eru frammanundan 2025, sum liggja til grund. Í praksis verður útrokningin gjørd í 2024, og tí verður støðið undir útrokningini miðal lívsævi í 2013/2014. Treytin fyri at pensjónsaldurin kann hækka er, at miðal lívsævið hjá 65 ára gomlum tvey tey seinastu árini er hægri, enn tað var í 2013/2014. Miðal lívsævið í 2013/2014 var 85,5 ár. T.v.s., um miðal lívsævið í bæði 2022/2023 og 2023/2024 er hægri enn 85,5 ár, er fortreyt fyri at hækka pensjónsaldurin.

Um tað kann staðfestast, at pensjónsaldurin kann hækka, verður livitíðarindeksið roknað. Livitíðarindeksið verður roknað eftir hesum frymli:

*Pensjónsaldur = 65 ár + miðal lívsævið í 2023/2024 hjá 65 ára gomlum + 0,2 – 18 ár sum pensjónistur*

Framrokningar vísa, at lívsævið hjá føroyingum árini frameftir væntandi verður miðal lívsævið í 2023/2024 hjá 65 ára gomlum í Føroyum 87,3, sum er hægri enn indeksárið (2022/2023 væntast eisini at verða hægri). T.v.s. at pensjónsaldurin sambært frymlinum omanfyri skal hækka. Pensjónsaldurin verður roknaður at skula hækka í 2035 soleiðis:

*Pensjónsaldur = 65 ár + 22,3 (sum er restlívsævi hjá 65 ára gomlum) + 0,2 – 18 = 69½ ár, ið verður rundað niður til 69 ár.*

Sambært frymlinum skal pensjónsaldurin hækka til 69 ár, men ásett er í lógini, at pensjónsaldurin í mesta lagi kann hækka við ½ ári hvørja ferð, og pensjónsaldurin skal sostatt hækka úr 68 ár upp í 68 ½ ár.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**

Við hesum uppskotinum vera framdar ymsar broytingar, ið ikki beinleiðis eru tengdar at hvørjum øðrum. Broytingarnar fevna um:

1. *Broytt samanseting av pensjón og og broytt mótrokning*
   Viðbótin í fólkapensjónini hækkar, samstundis sum viðbót til ávísar pensjónistar verður strika. Pensjónistar, sum ikki hava inntøku aftrat fólkapensjón og Samhaldsfasta, fara at hava áleið somu inntøku í ávikavist nýskipanini og í galdandi skipan. Tað verður mótroknað í grundupphæddini, og tað merkir, at fólkapensjónistar, sum hava høgar inntøkur, ikki fáa fólkapensjón. Hesi fara tó at fáa útgjald úr Samhaldsfasta.
2. *Mótrokning millum hjún*
   Mótrokning millum hjún verður strikað. Tað merkir, at fólkapensjónin frameftir ikki verður tengd at inntøku hjá hjúnafelaga.
3. *Útsett pensjón*
   Møguleiki verður at útseta pensjónina, soleiðis at ein persónur fær eitt longri arbeiðslív, og afturfyri fáa eina hægri fólkapensjón seinni. Fyri hvønn mánað, at pensjónin verður útsett, hækkar pensjónsveitingin við 0,45%, umframt 10 % fyri hvørjar samanhangandi mánaðir pensjónin verður útsett.
4. *Framskundað pensjón til niðurslitin*
   Persónar, sum eru niðurslitnir, kunnu trý ár áðrenn fólkapensjónsaldur søkja um framskundaða pensjón. Veitingin er í minsta lagi samsvarandi miðal fyritíðarpensjón.
5. *Pensjónsaldur*
   Pensjónsaldurin hækkar við hálvum ári fyrstu ferð í 2025 og aftur við hálvum ári í 2030. Hareftir hækkar pensjónsaldurin frá 2035 sbrt. einum livitíðarindeksi.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Umframt at uppskotið verður lagt til almenna hoyring á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni, verður uppskotið eisini sent beinleiðis til eina røð av hoyringspørtum. Fyri eitt samlað yvirlit yvir hoyringspartar verður víst til Fylgiskjal 2 “Trygg og varandi pensjónsskipan”.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur

Hetta uppskotið er partur av einum samlaðum lógarverki, sum á ymiskan hátt ávirkar útreiðslurnar hjá landskassanum, og sum á ymiskan hátt ávirkar haldføri fyri føroyska búskapin. Tað ber bert í avmarkaðan mun til at meta um fíggjarligu avleiðingarnar av nýskipanini sæð í mun til verandi pensjónsskipan – t.v.s. í mun til, at nýskipanin ikki verður framd. Uppskotið verður bert galdandi fyri tey, sum blíva fólkapensjónistar í 2020 og seinni. T.v.s., at tað verður ongin, sum fer at missa nakað. Nýggju pensjónistarnir fara at hava aðrar møguleikar at seta saman arbeiði og pensjón, og tað ber ikki til at siga, í hvussu stóran mun atburður fer at broytast, og í hvussu stóran mun fólkapensjónistar fara at brúka møguleikarnar í pensjónsnýskipanini. Pensjónin hækkar, og alt annað líka merkir tað øktar útreiðslur, men samstundis verða pensjónistar eggjaðir t.d. til at arbeiða meira ella útseta pensjón o.a., og tað økir um skattainntøkurnar, økir um mótrokningina, og minkar um útreiðslur landskassans.

Niðanfyri verða fíggjarligu avleiðingarnar av ymsu tættunum í hesum lógaruppskoti lýstar. Ymsu broytingarnar eru partur av eini heild, men tær ávirka ymiskt, og tað ber ikki til uttan víðari t.d. at “velja til og frá” og harvið kanska spara eina upphæddina, sum lýsingin niðanfyri vísir.

Uppskotið verður bert galdandi fyri tey, sum blíva fólkapensjónistar ársskiftið 2019/20, og tí fer ávirkanin á útreiðslurnar og ávirkanin á búskapinin at broytast stigvíst vaksandi. Fyrsta árið verða uml. 530 fólkapensjónistar í nýggju pensjónsskipanini, og veksir talið sostatt fyri hvørt ár. Í 2025 verða knappliga 3200 pensjónistar í nýggju skipanini, í 2030 verða tey uml. 5850, í 2040 verða tey uml. 10500 o.s.fr.

*2.1.1. Broytt samanseting av pensjón*

Landskassin sparir útreiðslurnar til VÁP, men hinvegin so hækkar viðbótin. Fyri fólkapensjónistar uttan aðra inntøku verður samlað sæð talan um eina hækking í útreiðslunum.

**Landskassans útreiðslur til ein fólkapensjónist uttan aðra inntøku**

| | **Støk** | | **Gift** | |
|---|---|---|---|---|
| | *Verandi* | *Nýskipan* | *Verandi* | *Nýskipan* |
| Grundupphædd | 43.068 | 43.068 | 32.796 | 32.796 |
| Viðbót | 45.252 | 57.348 | 36.372 | 42.444 |
| Viðbót til ávísar pensjónistar | 7.608 | - | 3.804 | - |
| **Útreiðslur tilsamans** | **95.928** | **100.416** | **72.972** | **75.240** |
| | | | | |
| Landsskattur | 7.155 | 8.970 | 5.820 | 6.735 |
| **Útreiðslur landskassans netto** | **88.773** | **91.446** | **67.152** | **68.505** |
| | | | | |
| Kommunuskattur (miðal) | 16.780 | 19.235 | 14.974 | 16.212 |

Árliga hækkingin í útreiðslum landskassans fyri hvønn pensjónist uttan aðra inntøku er sostatt 2.673 kr. fyri støk og 1.353 kr. fyri gift (landsskattur íroknaður). Tað ber tó ikki til at siga neyvt, hvussu hetta ávirkar samlaðu útreiðslur landskassans, tí inntøkuupplýsingar hjá teimum, sum blíva pensjónistar frameftir, eru ikki kendar.

Flestu fólkapensjónistar í verandi pensjónsskipan hava bert heilt lítla inntøku aftrat fólkapensjónini og Samhaldsfasta. T.v.s. eisini lægri enn 30.000 kr. um árið, sum er nýggja markið fyri mótrokning, og t.v.s., at hesi eisini í sbrt. nýskipanini fara at fáa fulla pensjón. Tó er tað soleiðis, at yngri fólkapensjónistar – tey 67-69 ára gomlu – í størri mun hava inntøkur aftrat fólkapensjón og Samhaldsfasta.

**Meting av útreiðslum landskassans orsakað av broyting í samanseting av pensjónsveitingum**

| (mió. kr.) | **2020** | **2021** | **2022** | **2025** | **2030** |
|---|---|---|---|---|---|
| *Basis (óbroytt samanseting av pensjónveiting og samhaldsfasti)* | | | | | |
| Grundupphædd og viðbøtur | 567,2 | 590,2 | 611,1 | 686,2 | 824,2 |
| Landsskattur frá pensjónistum | 126,6 | 135,1 | 143,5 | 173,3 | 233,4 |
| Útreiðslur hjá landskassanum | 440,6 | 455,1 | 467,6 | 512,9 | 590,8 |
| | | | | | |
| *Nýskipan (samanseting av pensjón undantikið broyting í pensjónsaldri* | | | | | |
| Framhald av verandi skipan | | | | | |
| Grundupphædd og viðbøtur | 530,3 | 514,7 | 498,2 | 446,7 | 349,9 |
| Landsskattur | 136,7 | 136,0 | 134,9 | 129,8 | 113,7 |
| Nýggir pensjónistar | | | | | |
| Grundupphædd og viðbót | 33,9 | 71,4 | 108,0 | 228,1 | 453,0 |
| Landsskattur | 10,6 | 22,2 | 34,1 | 77,1 | 169,7 |
| Útreiðslur landsk. av nýskipan | 416,9 | 427,9 | 437,2 | 467,9 | 519,5 |
| | | | | | |
| Minniútreiðslur av nýskipanini | 23,7 | 27,2 | 30,4 | 45 | 71,3 |

*Viðm.: Hækking av samhaldsfasta er íroknað skattainntøkur sambært nýskipanini*

Broytingin í samansetingini av pensjón hevur fyrstu fáu árini við sær bert smávegis broytingar í landskassaútreiðslum til fólkapensjón. Talið av persónum í nýggju pensjónsskipanini fer fyrstu 15 árini at økjast við 500-550 um árið. Ein lítil helvt av teimum, sum koma inn í skipanina fara at kosta landskassanum millum 1.353-2.673 kr. meira um árið. Fyrsta árið merkir broytingin, at útreiðslan til nýggjar pensjónistar helst verður minni enn talið lýst í talvuni. Hetta orsakað av, at nýggju pensjónistarnar koma inn í skipanina alt árið - umleið 1/12 fer at fáa pensjón í eitt heilt ár sambært nýggju samansetingini.

Teir fólkapensjónistar, sum arbeiða niðursetta tíð, fara í høvuðsheitum at fáa hægri pensjón við pensjónsnýskipanini, men kortini er ikki vist, at talan verður um eina útreiðslu fyri landskassan. Í tann mun fólkapensjónistar við lægri mótrokning fara at arbeiða meira, enn teir annars vildu gjørt, um pensjónsskipanin ikki varð broytt, fara skattainntøkur til land og kommunur eisini at økjast. Tað ber ikki til at meta um, hvørt fólkapensjónistar fara at broyta atburð. Ein avleiðing kann eisini blíva, at nøkur fara at arbeiða minni – t.d. tí tey fara at halda seg á eini inntøku lægri enn 30.000 kr. heldur enn 60.000 kr., sum er markið fyri mótrokning í verandi skipan.

Fylgjurnar av tvungnu uppsparingini fara ikki at vísa seg fyrstu nógvu árini – t.v.s., at tað er ikki tvungna uppsparingin, ið komandi árini fer ikki at hava við sær, at fólkapensjónistar fara at verða mótroknaðir.

Kommunuskattainntøkurnar hækka við umleið 2.450 kr. um árið fyri hvønn pensjónist uttan aðra inntøku. Hjá fólkapensjónistum, sum hava somikið høga inntøku aftrat pensjónini, at teir verða mótroknaðir, fara fyrst at verða mótroknaðir í grundupphæddini, sum er skattafrí. Fólkapensjónistar, sum hava høgar inntøkur missa í mun til verandi skipan alla grundupphæddina, men sum nevnt ávirkar tað ikki kommunuskattainntøkurnar.

Fólkapensjónistar, sum ikki hava inntøkur aftrat pensjónini, fara sostatt fyrsta árið at gjalda 600-700 tús. kr. meira í kommunuskatti, men eftir 10 árum er hetta talið økt til 8-8,5 mió. kr. Men her skal havast í huga, at roknað verður við skattaviðurskiftum, soleiðis sum tey eru í 2017, og tey kunnu broytast munandi, sum árini ganga.

*2.1.2. Mótrokning millum hjún*
Broytingin hevur í sjálvum sær ikki við sær fíggjarligar avleiðingar av týdningi fyri landið. Ein skipan við mótrokning er ein fyrimunur fyri nøkur og ein vansi fyri onnur – hetta er treytað av, hvussu inntøkan er býtt millum hjúnafelagarnar.

Í 2011 var eitt uppskot viðgjørt um at strika mótrokningina millum hjún hjá øllum táverandi giftum fólkapensjónistum, og vóru fíggjarligu avleiðingarnar tá mettar til eina meirútreiðslu fyri landskassan á uml. 2,5 mió. kr. Men við nýskipanini lækkar markið fyri mótrokning umleið niður í eina helvt, og tí fer metingin frá 2011 ikki at halda í mun til nýskipanina. Eisini skal havast í huga, at tað er bert hjá teimum, sum blíva fólkapensjónistar frá 2020 at mótrokningin millum hjún verður strikað, og fyrstu árini verður mótrokningin sostatt galdandi fyri lutfalsliga fáar fólkapensjónistar.

At talan bert er um nýggjar pensjónistar hevur sostatt við sær, at tað er ongin, sum fær broytt fíggjarligt grundarlag. Tey, sum blíva fólkapensjónistar sbrt. nýskipan, innrætta sítt arbeiðslív, sum hóskar teimum, og hóskar til galdandi reglar.

*2.1.3. Útsett pensjón*
Tað ber ikki til at meta um fíggjarligu avleiðingarnar fyri landskassan av útsettari pensjón. Talan er um eina nýggja skipan, og tað er ikki gjørligt at siga, hvussu nógvir persónar fara at brúka møguleikan.

Tað vil vera ein fíggjarligur vinningur fyri landskassan (og fyri tann einstaka), men fyrimunurin er treytaður av, hvussu høga inntøku og harvið, hvussu nógvur skattur verður goldin í tíðini, sum pensjónin verður útsett. Landið sparir útreiðsluna til pensjón, í tíðini pensjónin verður útsett, samstundis sum skattur verður goldin til land og kommunur. Hinvegin verður talan um eina meirútreiðslu tey eftirfylgjandi árini, tá fólkapensjónisturin velur at móttaka fólkapensjónina. Men havast skal tó í huga, at longda tilknýtið til arbeiðsmarknaðin hevur við sær, at persónurin, sum útsetir pensjónina, í longri tíð rindar til tvungnu uppsparingina, sum aftur verður mótroknað í fólkapensjónini.

Føroyingar kunnu í miðal vænta at liva í 19 ár sum fólkapensjónistar (við pensjónsaldri á 67 ár). Fólkapensjón í 19 ár kostar landinum uml. 2,3 mió. kr. áðrenn skatt. V.ø.o. lívslong pensjón kostar landinum uml. 2,3 mió. kr. í miðal pr. pensjónisti, um viðkomandi ikki hevur aðra inntøku. Verður skattainntøkan hjá landinum av lívslangari og framroknaði veiting, íroknað skattainntøka frá Samhaldsfasta, verður útreiðslan netto mett at verða umleið 2 mió. kr. í alt.

*Mynd 13: Kostnaðurin av lívslangari pensjón áðrenn skatt og mótrokning, hjá støkum pensjónisti*




So hvørt sum talið av árum við útsettari pensjón veksur, fer eisini eykaupphæddin í pensjónini at vaksa. Hjá einum støkum pensjónisti, ið væntast at liva í 19 ár sum fólkapensjónistur, verður samansetingin av pensjónsveitingini ymisk, í mun til hvussu nógv ár pensjónin verður útsett. Tess longri pensjónin verður útsett tess størri partur av pensjónini stavar frá útsettari pensjón.

*Mynd 14: Samanseting av pensjónsveitingini áðrenn skatt hjá støkum pensjónisti, ið hevur útsett pensjón*




Myndin vísir, at um ein pensjónistur velur at útseta pensjónina í eitt ár, fer viðkomandi at fáa nærum alla pensjónsveitingina í 19 ár útgoldin sum vanliga pensjón. So hvørt sum talið av árum við útsetan av pensjónini veksur, fer parturin av pensjónini, í írestandi lívstíð pensjónistsins, at koma frá útsettari pensjón.

Hjá teimum, sum útseta pensjónina, kostar fólkapensjónin meira enn 2,4 mió. kr., men tey gjalda skatt og supplerandi inntøka verður mótroknað, so nettoútreiðslan verður minni. Vinningurin fyri samfelagið er skatturin sum verður goldin í tíðini pensjónin verður útsett, umframt at persónurin er partur av arbeiðsmarknaðinum við teimum fyrimunum, sum hartil hoyra.

Avgerandi fyri møguleikan at útseta pensjónina er eitt framhaldandi tilknýti til arbeiðsmarknaðurin aftaná pensjónsaldurin er náddur. Sum dømi verður lýst virði av eyka mánaðarligari tøkari inntøku hjá einum pensjónisti, ið hevur útsett pensjónina og samstundis hevur eina lítla árliga uppsparing við einum árligum útgjaldi á 25.000 kr. (t.v.s., sum er aftrat fólkapensjón).

*Mynd 15: Eyka mánaðarlig inntøka hjá pensjónisti, ið hevur útsett pensjónina og hevur lítla uppsparing*




Sum tað sæst í myndini omanfyri gevur útsetan av pensjónini í eitt ár umleið 400 kr. eyka um mánaðin í tøkari inntøku, meðan t.d. 10 ár gevur pensjónistinum 7.200 kr. eyka um mánaðin.

Mett verður, at tað samlað fer at kosta landinum 1,8 mió. kr. um pensjónisturin velur at útseta pensjónina í 10 ár. Hetta skal síggjast í mun til 2 mió. kr. um pensjónisturin ikki heldur fram á arbeiðsmarknaðinum. Hetta dømi gevur sostatt landinum ein sparing upp á 200 tús. kr., íroknað skattainntøkur.

Talið av fólki, ið leypandi velja at útseta pensjónina er avgerandi fyri um skipanin kann bera seg fíggjarliga. Í myndini niðanfyri verður gjørd ein varlig meting av talinum av persónum í arbeiðsstyrkin, ið eru um pensjónsaldur og eldri, sum kunnu velja at útseta pensjónina.

*Mynd 16: Meting av árliga talinum av persónum, ið verða fólkapensjónistar, ið kunnu velja at útseta pensjónina*




*Viðm.: Hædd er tikið fyri broyttum pensjónsaldri.*

Meting av kostnaðurin í myndini niðanfyri vísir, at bæði skattainntøkur og pensjónsútreiðslur fara at vaksa. Hetta er eisini orsakað av eini meting av, at lønar- og skattainntøkur umframt pensjónsveiting fer at vaksa í tíðarskeiðinum, ið er lýst í myndini.

*Mynd 17:Meting av kostnaðinum av skipan við útsettari pensjón*




Skattainntøka hjá teimum, ið velja at útseta pensjónina, er lýst sum hækkandi orsakað av hækkandi inntøkugrundarlagnum í útrokningini, men er ikki roknað upp í metingina av samlaða kostnaðinum hjá landinum.

Útreiðslan hjá landinum er mett at verða minkandi frá 2 til 10 mió. kr. fyrstu 10 árini. Aftaná hetta verður útreiðslan mett at verða stigvíst hækkandi ár um ár orsakað av talinum av fólki, ið velur at útseta pensjónina. Pensjónsútreiðslurnar eru lýstar sum brutto-tøl og uttan mótrokning ella skatt.

Um áhugin at útseta pensjónina í eitt tíðarskeið minkar vegna t.d. vantandi áhuga ella hækkandi arbeiðsloysi, fer hetta helst at merkja, at leypandi kostnaðurin av at útgjalda eyka pensjónsveiting verður hægri enn skattainntøkan hjá teimum, ið velja at verða á arbeiðsmarknaðinum í pensjónsárunum.

Skipanin er gjørd á tann hátt, at rætturin til eyka pensjónsveiting kemur seinni og fer tað at merkja eyka útreiðslur fyri landið í mun til væntaða skattainntøku, um so er, at pensjónistar aftaná at skipanin hevur virka í eitt tíðarskeið, velja ikki at útseta pensjónina. Hetta kann sostatt ikki metast at verða ein fíggjarliga sjálvberandi skipan um ikki pensjónistar í framtíðini eisini velja at útseta pensjónina og við hesum eru við til at fíggja eyka útreiðslurnar til útsetta pensjón hjá teimum, ið hava vunnið sær rættin til eyka útgjald.

**Meting av útreiðslum landskassans orsakað av útsettari pensjón**

| (mió. kr.) | **2020** | **2021** | **2022** | **2025** | **2030** |
|---|---|---|---|---|---|
| Árlig minniútreiðsla til fólk, ið velja at útseta pensjónina | -2,3 | -3,6 | -4,9 | -10,4 | -16,9 |
| Eyka útgjald til fólk aftaná útsetta pensjón | 0,0 | 0,2 | 0,5 | 3,6 | 13,3 |
| Minniútreiðsla hjá landskassanum | -2,3 | -3,4 | -4,3 | -6,9 | -3,6 |

*2.1.4. Framskundað pensjón til niðurslitin*

Broytingin hevur ikki við sær fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan, tí landið frammanundan hevur fyriskipanir, ið lofta persónum, sum fara av arbeiðsmarknaðinum áðrenn fólkapensjónsaldur.

*2.1.5. Pensjónsaldur*

Tað eru millum 500 og 600 fólk, sum á hvørjum ári fylla 67, ár og sum blíva fólkapensjónistar. T.v.s., at tá fólkapensjónsaldurin hækkar við hálvum ári, sparir landskassin fólkapensjón til umleið helvtina av 500-600 fólkum, samstundis sum arbeiðsstyrkin og skattainntøkurnar hjá landskassanum økjast.

At fólkapensjónsaldurin hækkar merkir tó ikki, at øll tey, sum fylla 67 ár, verða longri á arbeiðsmarknaðinum. Ein partur av teimum, sum fylla 67 ár, eru farin av arbeiðsmarknaðinum, áðrenn tey blíva fólkapensjónistar. Umleið 25 % av teimum 65 og 66 ára gomlu eru fyritíðarpensjónistar, meðan uml. 5 % eru í tillagaðum- ella vardum starvi. Tá pensjónsaldurin hækkar kunnu nøkur væntast at leggjast aftrat hesum skipanum, so lutfalsligi parturin verður eitt sindur størri enn 25 og 5 %. Harumframt kann væntast, at nøkur av teimum, sum høvdu fingið fólkapensjón, í staðin fáa forsorgarhjálp, sjúkradagpening ella arbeiðsloysisstuðul.

Tá fólkapensjónsaldurin hækkar, fara nakrir persónar sostatt at fáa aðra veiting staðin. Serliga er tað fyritíðarpensjón, sum hevur týdning í hesum sambandi, tí talan er um eina varandi veiting, sum er munandi dýrari fyri landskassan enn fólkapensjón. Havast skal í huga, at týðandi partur av inntøkuni hjá fólkapensjónistum stavar frá Samhaldsfasta. Landsins útreiðslur í 2017 til ein fólkapensjónist uttan aðra inntøku er knappliga 91.700 kr. um árið, meðan útreiðslan til ein fyritíðarpensjónist er ávikavist 190.000 kr. til hægstu og 149.000 kr. til miðal fyritíðarpensjónistar (upphæddirnar eru til støk og eru íroknaðar landsskatt).

Umleið helvtin av persónunum í aldrinum 67-69 ár gomlu fáa við verandi skipan bert grundupphæddina, sum er ávikavist 43.068 kr. um árið til støk og 32.796 kr. til støk (í 2025 tá pensjónsaldurin hækkar fyrstu ferð verða upphæddirnar tó javnaðar og tí eitt sindur hægri). At tey ikki fáa viðbót og VÁP er í høvuðsheitum orsaka av ov høgari arbeiðsinntøku.

Tá pensjónsaldurin hækkar við einum hálvum ári, sparir landið uml. 19 mió. kr. í útreiðslum til fólkapensjón og fáa eyka 10 mió. kr. í skattainntøkum, men samstundis hækka útreiðslurnar til fyritíðarpensjón við uml. 13 mió. kr. Harumframt koma nakrar útreiðslur til sjúkradagpening, forsorgarhjálp og tillagað størv.

**Sparing hjá landskassanum orsakað av broyttum pensjónsaldri**

| (mió. kr.) | **2025** | **2030** |
|---|---|---|
| *Sparing í nýskipan av at broyta pensjónsaldurin* | | |
| Grundupphædd og viðbøtur | 19,3 | 44,5 |
| Landsskattur frá pensjónistum | -6,8 | -17,4 |
| Eyka landsskattur | 16,2 | 37,9 |
| Minniútreiðsla vegna tal av pensjónistum | 29,1 | 65,0 |

*Viðm.: Landið missir skattainntøkur frá pensjónistum, ið ikki fáa pensjón og samhaldsfasta*

**Eyka kostnaður hjá landskassanum orsakað av broyttum pensjónsaldri**

| (mió. kr.) | **2025** | **2030** |
|---|---|---|
| *Eyka kostnaðar í nýskipan av at broyta pensjónsaldurin* | | |
| Meting av eyka kostnaði til fyritíðarpensjón | 13,0 | 26,0 |
| Meting av eyka kostnaði til dagpening v.m. | 1,5 | 3,4 |
| Eyka kostnaðar samlað | 14,5 | 29,4 |
| *Samlað minni útreiðsla* | *14,6* | *35,6* |

*Viðm.: Virðið av broyttum skattainntøkum er ikki íroknað. Talan er um eina meting av øktum útreiðslum til sjúkradagpening og forsorgarveitingar, ið kemst av øktum talið av eldri fólk í arbeiðsstyrkini.*

Ein samlað meting av kostnaðinum hjá landskassanum av broytingunum í hesum lógaruppskoti verður lýst í talvuni niðanfyri. Íroknað er ikki ein meting av øktum skattainntøkum hjá kommununum. Roknað verður við javning av pensjónsveitingum við 1,5% og er útreiðslan hjá landskassanum og øktum skattainntøkum av hesum íroknað samlaða úrslitið.

**Meting av samlaðu útreiðslum landskassans orsakað av broytingunum í lógaruppskotinum**

| (mió. kr.) | **2020** | **2021** | **2022** | **2025** | **2030** |
|---|---|---|---|---|---|
| *Basis (óbroytt samanseting av pensjónveiting og samhaldsfasta)* | | | | | |
| Grundupphædd og viðbøtur | 567,2 | 590,2 | 611,1 | 686,2 | 824,2 |
| Landsskattur frá pensjónistum | 126,6 | 135,1 | 143,5 | 173,3 | 233,4 |
| Útreiðslur hjá landskassanum | 440,6 | 455,1 | 467,6 | 512,9 | 590,8 |
| | | | | | |
| *Nýskipananaruppskotini* | | | | | |
| *Framhald av verandi pensjónsskipan fyri persónar, ið gerast pensjónistar til og við 31.12.2019* | | | | | |
| Grundupphædd og viðbøtur | 530,3 | 514,7 | 498,2 | 446,7 | 349,9 |
| Landsskattur | 136,7 | 136,0 | 134,9 | 129,8 | 113,7 |
| *Nýskipan fyri persónar, ið verða pensjónistar frá og við 1.1.2020 (íroknað javning og pensjónsaldur)* | | | | | |
| Grundupphædd og viðbót | 33,9 | 71,4 | 108,0 | 208,7 | 408,5 |
| Landsskattur | 10,6 | 22,2 | 34,1 | 86,5 | 190,3 |
| Útreiðslur landsk. av nýskipan | 416,9 | 427,9 | 437,2 | 439,1 | 454,3 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Eyka útreiðslur orsakað pensjónsaldur | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 14,5 | 29,4 |
| Minniútreiðslur orsakað av útsettari pensjón | -2,3 | -3,4 | -4,3 | -6,9 | -3,6 |
| *Eyka kostnaður av eftirløn av almennum veitingum* | *8,4* | *9,6* | *10,7* | *14,9* | *16,1* |
| | | | | | |
| Minniútreiðslur av nýskipanini íroknað skattainntøkur | -13,0 | -14,0 | -15,3 | -66,6 | -146,2 |
| Minniútreiðslur uttan skattainntøkur | 3,1 | 2,1 | 1,5 | -8,3 | -23,9 |

*Viðm.: Árliga javningin av samhaldsfasta við 2,98% er íroknað skattainntøkurnar sambært nýskipanini. Eyka kostnaður av eftirløn av almannaveitingum er sambært øðrum lógaruppskoti. Íroknað er 30% afturbering av pensjónsskatti til landið.*

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur við sær umsitingarligar avleiðingar fyri landið.

Sambært uppskotinum hækkar pensjónsaldurin stigvíst fyri tey, ið eru fødd aftan á 1. juli 1957, bæði sum ásett í lóg og sum avleiðing av hækkaðari miðallívstíð (livitíðarindeksering). Hetta hevur við sær nakað av umsitingarligum avleiðingum fyri Almannaverkið og Hagstovuna.

Skilt verður í uppskotinum millum "gamlar og nýggjar" fólkapensjónistar, tvs tey, ið eru fødd áðrenn og aftaná ársskiftið 1952-53. Í mun til veitingarnar í viðbót til fólkapensjón og frádráttarfríu inntøkuupphæddina í grundupphædd og viðbót verður talan um tvær ymiskar skipanir í somu lóg, og kemur hetta at hava við sær økta umsiting hjá Almannaverkinum.

Møguleikin hjá fólkapensjónistum at velja at útseta pensjónina er nýggj skipan, ið søkjast skal um hjá Almannaverkinum, og áleggur lógaruppskotið tí Almannaverkinum økta umsiting til at umsita hesa skipan.

Møguleikin hjá fólkapensjónistum at søkja um framskundaða pensjón er somuleiðis nýggj skipan, ið ikki er roynd áður. Ein ávís meting skal gerast av Almannaverkinum, áðrenn umsókn um framskundaða pensjón kann játtast, og viðførir henda nýggja skipanin tí nakað av umsitingarligum avleiðingum fyri Almannaverkið. Viðmerkjast skal tó, at fleiri av teimum, ið fara at søkja um framskundaða pensjón, eru tey somu, sum annars høvdu søkt um at fáa tillutaða fyritíðarpensjón, og fer broytingin tí ikki at økja stórvegis um umsitingarligu byrðuna hjá Almannaverkinum.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**

Uppskotið hevur við sær avleiðingar fyri fólkapensjónistar. Í mun til fólkapensjónsaldur og samanseting av veitingum verður tað ymiskt, alt eftir um viðkomandi er føddur áðrenn ella aftaná ársskiftið 1952-53 eins og at broyting verður gjørd í uppgerðini av inntøkugrundarlagnum soleiðis, at hetta verður víðkað til eisini at fevna um mótrokning í tvungnari uppsparing sambært reglunum í eftirlønarlógini.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið hevur ikki ávirkan á millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið hevur ikki ávirkan á tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

**2.9. Marknaforðingar**
Ongar kendar marknaforðingar eru á økinum.

**2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Av tí at lógaruppskotið treytar fleiri upplýsingar ísv umsókn um grundupphædd. Øll skulu geva upplýsingar tá søkt verður um fólkapensjón. Upplýsingar um arbeiðs

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Landsstýrismanninum verður heimilað at áseta nærri reglur um uppgerð um vavið av arbeiðinum, herundir um persónligt arbeiði í sjálvstøðugari fyritøku og um eftirlit í hesum sambandi eins og um útrokning av einnýtisupphæddum.

Landsstýrismanninum verður heimilað at hækkað fólkapensjónsaldurin við støði í livitíðarindeksi, sbrt. broyting nr. 3 í lógaruppskotinum.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

## 2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**
Til § 1, nr. 1, 2, 4, 5, 11, 12, 14, 22, 23, 24, 25 og 26
Talan er um fylgibroytingar orsakað av nýggjari áseting um framskundaða pensjón, sí serligar viðmerkingar til § 1, nr. 7.

Til § 1, nr. 3, 8, 9, 10, 13, 14, 15, 16, 27 og 28
Talan er um fylgibroytingar orsakað av broyttum pensjónsaldri, sí serligar viðmerkingar til § 1, nr. 6.

Til § 1, nr. 6 (pensjónsaldur)
Í mun til galdandi lóg hevur broytingin við sær eina hækkan í pensjónsaldrinum fyri tey, ið eru fødd aftaná 30. juni 1957. Pensjónsaldurin hækkar í fyrsta umfari upp í 67½ ár og síðan upp í 68 ár. Samstundis verður sonevnd "livitíðarindeks-skipan" sett í verk. Ítøkiliga merkir hetta, at pensjónsaldurin hjá teimum, ið eru fødd aftaná 31. desember 1962 hækkar um so er, at útrokningar vísa, at miðallívstíðin hjá 65-ára gomlum føroyingum hækkar.

Hvørt 5. ár verður miðal lívstíðin hjá teimum 65-ára gomlu føroyingunum kannað, og um liviárini eru longd nóg nógv, hækkar fólkapensjónsaldurin. Pensjónsaldurin kann í mesta lagi hækka við hálvum ári hvørja ferð. Hækkaði fólkapensjónsaldurin verður ásettur við virknaði frá 1. januar í álmanakkaárinum 10 ár aftaná árið, tá aldurin varð tillagaður, tvs at fyri borgaran merkir hetta eina vissu um at pensjónsaldurin ikki hækkar í óðum verki, men verður tillagaður við rímiligari freist.

Ein hækking av pensjónsaldrinum hevur við sær, at fólk skulu verða longri tíð enn áður á arbeiðsmarknaðinum, áðrenn tey kunnu søkja um og fáa tillutaða fólkapensjón.

Til § 1, nr. 7 (framskundað pensjón)
Sambært uppskotinum skal bera til at søkja um framskundaða pensjón frá degnum, tá 3 ár eru eftir til fólkapensjónsaldur er rokkin. Hetta merkir, at tíðspunktið fyri at søkja um framskundaða pensjón hækkar so hvørt sum pensjónsaldurin hækkar. Treytirnar fyri at kunna søkja um framskundaða pensjón eru harumframt, at viðkomandi skal lúka treytirnar um tillutan av fyritíðarpensjón sbrt. § 8, tvs lægstu fyritíðarpensjón. Sum orðingin sigur, so er talan um eina framskundan av fólkapensjónini, og tí eigur upphæddin at samsvara upphæddini til vanliga fólkapensjón. Tað er tí ásett, at framskundað pensjón svarar til í minsta lagi miðal fyritíðarpensjón, ið er ájavnt upphæddini til vanliga fólkapensjón. Hædd verður samstundis tikin fyri, at møguligt skal vera at søkja um hægstu fyritíðarpensjón.

Til § 1, nr. 11 (útsett pensjón)
Ætlanin við uppskotinum um útsetta pensjón er at geva komandi fólkapensjónistum møguleikan at velja at útseta útgjaldið av pensjónini fyri í staðin at fáa útgoldið eina "bíðiviðbót" afturat fólkapensjónini, tá viðkomandi fólkapensjónistur gevst á arbeiðsmarknaðinum og velur at fáa útgoldið fólkapensjónina. Sokallaða "bíðiviðbótin" verður útgoldin saman við fólkapensjónini so leingi viðkomandi livir.

Ætlanin við uppskotinum um útsetta pensjón er sostatt, at tað skal verða gjørligt hjá fólkapensjónistum at velja at arbeiða longri fyri síðani at fáa hægri pensjónsútgjald.

Treytin fyri at søkja um útsetta pensjón er, at viðkomandi hevur rokkið pensjónsaldur. Umbøn um útsetta pensjón kann tí í fyrsta lagi latast inn samstundis, sum viðkomandi søkir um fólkapensjón. Til ber eisini at lata umbøn inn seinni, men útsett pensjón verður ikki rindað við afturvirkandi kraft. Umbøn um útsetta pensjón hevur virknað frá 1. í mánaðinum eftir, at umbønin er latin inn, tó í fyrsta lagi frá tí degi, tá fólkapensjónin kundi verið útgoldin.

Fyri hvønn mánað, pensjónin verður útsett, er bíðiparturin 0,45. Tá bíðiparturin verður uppgjørdur, verður virðið avrundað til næsta heila tal. Talvan niðanfyri vísir gongdina og hvussu bíðiparturin verður avrundaður:

| **Mánaðir við útsettari pensjón** | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Mánaðir | **1** | **2** | **3** | **4** | **5** | **6** | **7** | **8** | **9** | **10** | **11** | **12** |
| Bíðipartur | 0,0 | 0,5 | 0,9 | 1,4 | 1,8 | 2,3 | 2,7 | 3,2 | 3,6 | 4,1 | 4,5 | 5,9 |
| Avr. bíðipartur | 0,0 | 0,0 | 1,0 | 1,0 | 2,0 | 2,0 | 3,0 | 3,0 | 4,0 | 4,0 | 5,0 | 6,0 |
| Mánaðir | **13** | **14** | **15** | **16** | **17** | **18** | **19** | **20** | **21** | **22** | **23** | **24** |
| Bíðipartur | 6,4 | 6,8 | 7,3 | 7,7 | 8,2 | 8,6 | 9,1 | 9,5 | 10,0 | 10,4 | 10,9 | 12,5 |
| Avr. bíðipartur | 6,0 | 7,0 | 7,0 | 8,0 | 8,0 | 9,0 | 9,0 | 10,0 | 10,0 | 10,0 | 11,0 | 12,0 |
| Mánaðir | **25** | **26** | **27** | **28** | **29** | **30** | **31** | **32** | **33** | **34** | **35** | **36** |
| Bíðipartur | 12,9 | 13,4 | 13,8 | 14,3 | 14,7 | 15,2 | 15,6 | 16,1 | 16,5 | 17,0 | 17,4 | 19,7 |
| Avr. bíðipartur | 13,0 | 13,0 | 14,0 | 14,0 | 15,0 | 15,0 | 16,0 | 16,0 | 17,0 | 17,0 | 17,0 | 20,0 |
| Mánaðir | **37** | **38** | **39** | **40** | **41** | **42** | **43** | **44** | **45** | **46** | **47** | **48** |
| Bíðipartur | 20,1 | 20,6 | 21,0 | 21,5 | 21,9 | 22,4 | 22,8 | 23,3 | 23,7 | 24,2 | 24,6 | 27,6 |
| Avr. bíðipartur | 20,0 | 21,0 | 21,0 | 21,0 | 22,0 | 22,0 | 23,0 | 23,0 | 24,0 | 24,0 | 25,0 | 28,0 |
| Mánaðir | **49** | **50** | **51** | **52** | **53** | **54** | **55** | **56** | **57** | **58** | **59** | **60** |
| Bíðipartur | 28,0 | 28,5 | 28,9 | 29,4 | 29,8 | 30,3 | 30,7 | 31,2 | 31,6 | 32,1 | 32,5 | 36,3 |
| Avr. bíðipartur | 28,0 | 28,0 | 29,0 | 29,0 | 30,0 | 30,0 | 31,0 | 31,0 | 32,0 | 32,0 | 33,0 | 36,0 |
| Mánaðir | **61** | **62** | **63** | **64** | **65** | **66** | **67** | **68** | **69** | **70** | **71** | **72** |
| Bíðipartur | 36,7 | 37,2 | 37,6 | 38,1 | 38,5 | 39,0 | 39,4 | 39,9 | 40,3 | 40,8 | 41,2 | 45,8 |
| Avr. bíðipartur | 37,0 | 37,0 | 38,0 | 38,0 | 39,0 | 39,0 | 39,0 | 40,0 | 40,0 | 41,0 | 41,0 | 46,0 |
| Mánaðir | **73** | **74** | **75** | **76** | **77** | **78** | **79** | **80** | **81** | **82** | **83** | **84** |
| Bíðipartur | 46,3 | 46,7 | 47,2 | 47,6 | 48,1 | 48,5 | 49,0 | 49,4 | 49,9 | 50,3 | 50,8 | 56,4 |
| Avr. bíðipartur | 46,0 | 47,0 | 47,0 | 48,0 | 48,0 | 49,0 | 49,0 | 49,0 | 50,0 | 50,0 | 51,0 | 56,0 |
| Mánaðir | **85** | **86** | **87** | **88** | **89** | **90** | **91** | **92** | **93** | **94** | **95** | **96** |
| Bíðipartur | 56,8 | 57,3 | 57,7 | 58,2 | 58,6 | 59,1 | 59,5 | 60,0 | 60,4 | 60,9 | 61,3 | 67,9 |
| Avr. bíðipartur | 57,0 | 57,0 | 58,0 | 58,0 | 59,0 | 59,0 | 60,0 | 60,0 | 60,0 | 61,0 | 61,0 | 68,0 |

| Mánaðir | 97 | 98 | 99 | 100 | 101 | 102 | 103 | 104 | 105 | 106 | 107 | 108 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Bíðipartur | 68,4 | 68,8 | 69,3 | 69,7 | 70,2 | 70,6 | 71,1 | 71,5 | 72,0 | 72,4 | 72,9 | 80,7 |
| Avr. bíðipartur | 68,0 | 69,0 | 69,0 | 70,0 | 70,0 | 71,0 | 71,0 | 72,0 | 72,0 | 72,0 | 73,0 | 81,0 |
| **Mánaðir** | **109** | **110** | **111** | **112** | **113** | **114** | **115** | **116** | **117** | **118** | **119** | **120** |
| Bíðipartur | 81,1 | 81,6 | 82,0 | 82,5 | 82,9 | 83,4 | 83,8 | 84,3 | 84,7 | 85,2 | 85,6 | 94,7 |
| Avr. bíðipartur | 81,0 | 82,0 | 82,0 | 82,0 | 83,0 | 83,0 | 84,0 | 84,0 | 85,0 | 85,0 | 86,0 | 95,0 |

Fyri hvørjar 12 samanhangandi mánaðir, ið pensjónin verður útsett, verður bíðiparturin hækkaður við 10% av tí higartil samansparda bíðipartinum.

Til § 1, nr. 18 (mótrokning grundupphædd – gomul skipan)
Av tí at tað framyvir verða tvær fólkapensjónsskipanir, tvs at skilt verður ímillum tey, ið eru fødd ávikavist áðrenn og aftaná 1. januar 1953 í mun til samanseting av veitingum, so er neyðugt at broyta galdandi § 18, stk. 1, soleiðis at tað greitt framgongur, at galdandi áseting um at grundupphæddin til fólkapensjón verður útgoldin uttan mun til fíggjarligu viðurskiftini bert er galdandi fyri tey, ið eru fødd áðrenn 1. januar 1953.

Til § 1, nr. 19 (mótrokning grundupphædd – nýggj skipan)
Talan er um nýggja áseting. Eins og nevnt omanfyri til pkt. 3 er talan um avleiðing av at tað framyvir verða tvær skipanir. Broytingin hevur við sær, at fyri tey, ið eru fødd eftir 31. desember 1952, verður grundupphæddin til fólkapensjón mótrokningarfrí í aðrari árligari inntøku upp til 30.000 kr. árliga, og síðani verður lækkað í grundupphæddini við 25%.

Til § 1, nr. 20 (mótrokning viðbót – gomul skipan)
Sambært galdandi lóggávu verður viðbótin til fólkapensjón lækkað við 60% av inntøkugrundarlagnum. Hetta skal framvegis vera galdandi fyri tey, ið eru fødd áðrenn 1. januar 1953, og er tí neyðugt við eini nágreining um, at galdandi áseting bert fevnir um tey, ið eru fødd áðrenn 1. januar 1953. Aftur ein avleiðing av, at tað framyvir verða tvær fólkapensjónsskipanir.

Til § 1, nr. 21 (mótrokning viðbót – nýggj skipan og mótrokning millum hjún)
Talan er um nýggja áseting sum avleiðing av, at skilt verður ímillum tey, ið eru fødd áðrenn og frá 1. januar 1953. Fyri tey, ið eru fødd aftaná 31. desember 1952, verður viðbótin til fólkapensjón mótrokningarfrí í aðrari árligari inntøku upp til 202.300 kr. fyri støk og 161.200 kr. fyri gift (í mun til 61.900 kr. í verandi skipan). Lækkað verður síðan í viðbótini við 40% av inntøkugrundarlagnum, um onnur inntøka er. Mótrokningarfría upphæddin fyri grundupphædd verður javnað árliga, og í tí sambandi verður mótrokningarfría upphæddin fyri viðbótina ásett soleiðis, at mótrokning í viðbót altíð tekur við, eftir at grundupphæddin er fult mótroknað.

Eisini verður skipanin við mótrokning millum hjún broytt soleiðis at um annar hjúnafelagin er føddur aftaná 31. desember 1952, tvs er í sokallaðu "nýggju skipanini", og giftur við hjúnafelaga føddur áðrenn 1. januar 1953, so verða inntøkurnar ikki lagdar saman, og lækkað (mótroknað) verður bert í inntøkuni hjá hjúnafelaganum í "gomlu skipanini", tvs fødd áðrenn 1. januar 1953. Hetta fyri at veitingar til komandi pensjónistar ikki verða ávirkaðar av, hvørji støðu hjúnafelagin er í.

Til § 1, nr. 22 (broyting av inntøkugrundarlagi)

Sambært galdandi lóg verður inntøkugrundarlagið, sum mótroknast kann í, gjørt upp eftir ásetingunum í § 20, stk. 1 og 2. Broytingin hevur við sær, at uppgerðin av inntøkugrundarlagnum verður broytt soleiðis, at víðkað verður um inntøkugrundarlagið við at tað eisini gerst møguligt at mótrokna í tvungnari uppsparing sambært reglunum í eftirlønarlógini.

Til § 1, nr. 30 (framskundað pensjón veitt frá umsóknardegnum)
Sambært galdandi lóg verður pensjón (fólka- og fyritíðarpensjón) veitt frá 1. í mánaðinum eftir, at umsóknin er játtað, tó í seinasta lagi frá 1. í fjórða mánaðinum eftir, at umsóknin er móttikin.

Framskundað pensjón er ætlað teimum, sum orsakað av niðurslitni vegna hart fysiskt ella sálarligt arbeiði, ikki longur orka at verða á arbeiðsmarknaðinum. Hesi hava so møguleika at søkja um framskundaða pensjón, tá 3 ár ella minni eru eftir til pensjónsaldurin er náddur. Av tí at talan er um at framskundað vanligu fólkapensjónina, skal veitingin kunna útgjaldast so skjótt sum til ber aftaná, at treytirnar eru loknar.

**Til § 2**
Gildiskoma.

Almannamálaráðið, 3. november 2017

**Eyðgunn Samuelsen**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: “Trygg og varandi pensjónsskipan”